| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>17. mars 2016 | Blað nr.: 12863<br><br>Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 17. mars 2016 **Kl**. 18:00
**Stað**: Býráðssalurin
**Málsnr:**

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Jógvan Arge
Helena Dam á Neystabø
Tróndur Sigurðsson
Halla Samuelsen
Bogi Andreasen
Annfinn Brekkstein
Marin Katrina Frýdal
Bjørghild Djurhuus
Elin Lindenskov
Sjúrður Olsen

**LUTTÓKU EISINI:**
Ingunn Eiriksdóttir
Mikael Viderø
Randi Saxov

**LUTTÓKU IKKI:**
Jákup Dam, ið var uttanlanda.
Sigrun Mohr, ið var uttanlanda.

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

**Forfundur kl. 17:30:**
Leiðarin á Visit Tórshavn greiddi frá um ferðavinnu í kommununi.

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 69/16 | 16/00042-1 | Mál beind í nevndir 2016 | 12867 |
| 70/16 | 16/00040-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2016 | 12868 |
| 71/16 | 16/01254-1 | Restgjald í sambandi við partalagsavtalu - skúlin á Argjahamri | 12869 |
| 72/16 | 14/05063-1 | Miðbýarætlan - Uppihaldstrappa í Vágsbotni | 12870 |
| 73/16 | 15/01982-1 | Glastak á perlutorg | 12874 |
| 74/16 | 15/04601-1 | Verkætlan - Tørvur og strategi - bústaðarmøguleikar til eldri | 12877 |
| 75/16 | 14/00772-13 | Bygginevndin fyri Hoyvíkar kirkju- kirkjugarður í Hoyvík (2007-2036) | 12880 |
| 76/16 | 14/05223-3 | Umsókn frá Eysturskúlanum um játtan at keypa 27 fót glastrevjabát | 12884 |
| 77/16 | 15/01854-2 | Tórshavnar kommuna yvirtekur leigumál millum Kiwanis Tórshavn og Kiwanis Rósan sum eigari og Almanna- og heilsumálaráðið vegnað Nærverkið sum leigara. | 12887 |
| 78/16 | 16/01163-1 | Avtøka av serstøku byggisamtykt nr 12 | 12889 |
| 79/16 | 15/00994-8 | Umsókn um byggiloyvi til skúr/úthús á matr. nr. 135hi, Hoyvík. | 12890 |
| 80/16 | 14/00671-16 | Sp/f Bilrøkt. Fyrispurningur um keyp av parti av matr. nr. 1070a. | 12893 |
| 81/16 | 14/02295-2 | Umhvørvisstovan : Umsókn vegna Elin Reinert Planck og Óli Reinert um sundurbýti av matr. nr. 1050b, Tórshavn | 12896 |
| 82/16 | 16/01132-1 | Meirjáttan til konto 8114 í sambandi við keyp av salti til goymsluna | 12898 |
| 83/16 | 14/00614-13 | Ferðslutrygdarætlan | 12899 |
| 84/16 | 15/00192-1 | Ferðslutryggjan av bygdavegunum í Kollafirði | 12901 |
| 85/16 | 15/00790-6 | Dagføring av vegnum undir Bryggjubakka- við uppihaldstrappuna har Perlan hevur staðið | 12902 |
| 86/16 | 16/00850-1 | Ferðsluviðurskifti við skúlan í Fríðrik Petersensgøtu | 12904 |
| 87/16 | 16/00375-4 | Umsókn um byggiloyvi til bilhús/skýli | 12905 |
| 88/16 | 16/00699-2 | Umsókn um broyting av byggisamtyktini fyri matr. nr. 1470 m | 12907 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | | frá D1-øki til A1-øki | |
| 89/16 | 16/00207-1 | Gamlarætt. Leinging av flótibrúgv til ferðavinnubátar. | 12908 |
| 90/16 | 16/00285-1 | Broyting av bátaøkinum á Skálatrøð frá teymum til bátabummar | 12910 |
| 91/16 | 14/05161-3 | Útstykking á Kongavarða til grundstykkir á matr. nr. 255a, Argir | 12912 |
| 92/16 | 16/00654-1 | Útleigan/søla av Sjóvinnuhúsinum | 12916 |
| 93/16 | 16/01304-1 | Eykajáttan í sambandi við at at Tórshavnar kommuna verður 150 ár í 2016 | 12919 |
| 94/16 | 16/01224-1 | FÆ 2017 - tíðarætlan | 12920 |

## ***69/16 Mál beind í nevndir 2016***

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 5/16 | 16/00042-1 |
| 2 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 34/16 | 16/00042-1 |
| 3 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 69/16 | 16/00042-1 |

**Málslýsing:**

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Tikið til eftirtektar.

# 70/16 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2016

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 09.03.2016 | 115/16 | 16/00040-1 |
| 2 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 70/16 | 16/00040-1 |

**Málslýsing:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. § 10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 09. marts 2016:** Framlagt og góðkent.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Framlagt og góðkent.

# 71/16 Restgjald í sambandi við partalagsavtalu - skúlin á Argjahamri

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 09.03.2016 | 94/16 | 16/01254-1 |
| 2 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 71/16 | 16/01254-1 |

**Málslýsing:**
Articon eigur til góðar kr. 260.000 (íroknað mvg) hjá Tórshavnar kommunu.
Rokningin er dagfest 3. desember 2008 og er partur av fasu 1 í partalagsavtaluni.
Kommunan rindaði rokningina , í fyrsta umfari, tann 19. desember 2008.
Seinni bleiv hon mótroknað í uppgerðini av insitamentspuljuni. T.v.s. at rokningin er ikki goldin.

Articon hevur regluliga gjørt vart við kravið. Men kommunan hevur víst kravinum aftur.
Seinni er tekniska umsitingin komin til ta niðurstøðu, at Articon hevur rætt til samsýningina sambært partalagsavtaluni 1.2.1 fasa 1:
"Fasa 1 fevnir um útgreining av tilboði og eftirfylgjandi tillagingar av projektinum, soleiðis at verkætlanin heldur seg innanfyri tann fíggjarkarm sum byggiharrin hevur ásett fyri verkætlanina."

Verkætlanin bleiv lokað og gjørd upp í desember 2013.

Neyðugt er tí við eini eyka játtan uppá kr. 221.000.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og fyrisitingarstjórin mæla til at játta kr. 221.000 av kontu 20910 Aðrar inntøkur.

**Fíggjarnevndin 09. marts 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Einmælt samtykt.

# 72/16 Miðbýarætlan - Uppihaldstrappa í Vágsbotni

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2014 | 59/14 | 14/05063-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 03.12.2014 | 330/14 | 14/05063-1 |
| 3 Býráðsfundur | 11.12.2014 | 253/14 | 14/05063-1 |
| 4 Ferðslunevndin | 27.01.2015 | 11/15 | 14/05063-1 |
| 5 Ferðslunevndin | 03.02.2015 | 12/15 | 14/05063-1 |
| 6 Tekniska nevnd | 11.02.2015 | 29/15 | 14/05063-1 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.02.2015 | 28/15 | 14/05063-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 26.02.2015 | 49/15 | 14/05063-1 |
| 9 Býráðsfundur | 26.02.2015 | 35/15 | 14/05063-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 17.03.2015 | 88/15 | 14/05063-1 |
| 11 Tekniska nevnd | 17.03.2015 | 39/15 | 14/05063-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 18.03.2015 | 72/15 | 14/05063-1 |
| 13 Býráðsfundur | 19.03.2015 | 48/15 | 14/05063-1 |
| 14 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.03.2016 | 76/16 | 14/05063-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 09.03.2016 | 96/16 | 14/05063-1 |
| 16 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 72/16 | 14/05063-1 |

## Málslýsing:

Í sambandi við hugskots- og prosjektkappingina, sum var liðug 16. mai 2014 (journal nr. 14/01637), var ætlanin at koma í gongd við at gera fyribils kostnaðarmetingar og raðfesta tey ymisku átøkini í miðbýnum til langtíðar íløguætlanina hjá býráðnum (journal nr. 14/01463).

Kappingin var býtt sundur í tvær uppgávur, eina heildarætlan fyri allan miðbýin og eina prosjektkapping fyri økið kring Steinatún.

Í sambandi við kappingina hava Zeta arkitektar, sum fingu 1. virðisløn í kappingini, gjørt eina fyribils kostnaðarmeting av eini uppihaldstrappu í Vágsbotni. Kostnaðarmetingin fevnir um eitt øki uppá 310 $m^2$ millum Mylnugøtu og Bryggjubakka.

Kostnaðarmetingin er gjørd út frá einum skitsuuppskoti, ið fevnir um eina uppihaldstrappu í ljóst-litaðum betongi, ið bindur økið framman fyri Bojsensgarð og torgið í Vágsbotni saman. Trappan verður skipað við smærri uppihaldsøkjum úr timbri umframt trøum og plantum. Talan er somuleiðis um ein lítlan pop-up pall við segldúki, ið kann setast upp í sambandi við tiltøk, nýggj ljósarmatur, nýggjan belegning framman fyri Bojsensgarð og eina lækkan av grótlaðaða garðinum. Økið framman fyri Havnar kirkju, ið fevnir um 250 $m^2$, kann møguliga eisini gerast ein partur av uppskotinum (verður roknað sum tilval).

Kostnaðarmetingin ljóðar uppá kr. 1.911.609. Og við eini óvissu uppá 20% gevur tað kr. 2.300.000 mió.

Býarskipanardeildin mælir nevndini til at taka støðu til, um peningur skal játtast til prosjektering av verkætlanini, soleiðis at ein meira nágreinilig kostnaðarmeting kann gerast fyri verkætlanina.

Í upprunaligu íløguætlanini fyri 2014 stóðu kr. 9 mió. til miðbýarætlan og kr. 2 mió. til spælipláss í miðbýnum. Eftir endurskoðan av íløguætlanini og flytingar til onnur endamál eru

í dag kr. 3.109 mió. til miðbýarætlan og kr. 850.00 til spælipláss í miðbýnum. Í uppskotinum til íløguætlan fyri 2015 eru kr. 5 mió. settar av til miðbýarætlan.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at nevndin tekur støðu til um arbeiðast skal víðari við ætlanini.

Um arbeiðast skal víðari við ætlanini, mælir tekniski stjórin til:
- at játtaðar verða kr. 110.300 av íløgunum til miðbýarætlanina, til prosjektering og útbjóðing
- at projekt verður gjørt og arbeiðið boðið út í innbodna lisitatión
- at málið verður lagt fyri nevndina aftur, tá tilboðini eru komin inn.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2014:** Samtykt at arbeiða víðari við málinum eftir leistinum omanfyri og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Fíggjarnevnd 03. december 2014:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 11. desember 2014:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við arbeiðið at planleggja uppihaldstrappuna, er uppskot komið frá Zeta arkitektum, at broyta vegaføringina á brekkuni niðan á Bryggjubakka.

**Ferðslunevndin 27. januar 2015:** Málið umrøtt, Zeta arkitektar arbeiða víðari við málinum.

**Ferðslunevndin 03. februar 2015:** Zeta arkitektar framløgdu tvey uppskot, uppskot 1 og uppskot 2. Nevndin samtykti at taka undir við uppskot nr. 2. Málið beint í teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Í framhaldi av viðgerðini av málinum um trappuna skal støða verða tikin til møguliga dagføring av brekkuni niðan á Bryggjubakka.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Eingin peningur er settur av til at dagføra brekkuna niðan á Bryggjubakka innan íløgur fyri 2015.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við ferðslunevndini.
Harumframt verður mælt til at játta kr. 100.000,- til at gera skitsuuppskot við kostnaðarmeting av at dagføra brekkuna niðan á Bryggjubakka, at leggja fyri nevndina aftur og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 11. februar 2015:** Umboð frá Zeta Arkitektum løgdu fram uppskot um loysn av trappu og ferðsluloysn á økinum, dagf. 11.02.2015. Nevndin samtykti at taka undir við ferðslunevndini og at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina til víðari avgreiðslu.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. februar 2015:** Kunnað varð um málið.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 100.000,- til skitsuuppskot við kostnaðarmeting at leggja fyri faknevndirnar aftur og at arbeiðið verður fíggjað av kto 8175 íløgur fyri vegaætlanir 2015.

**Fíggjarnevnd 26. februar 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundir 26. februar 2015:** Samtykt við 12 atvkøðum fyri og ongari ímóti at játtað 100.000 kr. av konto 8175 til skitsuuppskot við kostnaðarmeting.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Rúni Djurhuus, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Jógvan Arge.

Greiddi ikki atkvøðu: Jan Christiansen.

**Ískoyti:**
Í sambandi við arbeiðið at planleggja uppihaldstrappuna, har sum Perlan á sinni stóð, er kostnaðarmetingin dagførd út frá betri loysnum í sambandi við vali av tilfari. Í upprunaliga uppskotinum var ljóst litað betong valt sum tilfar til trappuna. Nýggja uppskotið vísir á føroyskt grót sum tilfar, tí tað bæði hóskar seg betri til økið og úttrykkið á staðnum.

Sambært metingum frá Zeta arkitektum er dagførda kostnaðarmetingin 2.576.865 kr. uttan MVG. Pallur áljóðandi 153.000 kr. er íroknaður kostnaðarmetingina. Pallurin kann sparast burtur, men fyri at fáa eitt nøktandi heildarprosjekt mælir býarskipanardeildin frá at spara pallin burtur.

Í dagførdu kostnaðarmetingini verður óvæntað roknað við 20%, men um hetta verður sett niður til 15%, og pallurin er spardur burtur, verður samlaða kostnaðarmetingin kr. 2.265.000.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at játta samlaðu upphæddina kr. 2.737.919 við MVG av kto. 6275 fyri miðbýarætlanina og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 17. mars 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 17. mars 2015:** Kunnað varð um málið.
**Ískoyti:**
Trý tilboð eru komin inn at gera uppihaldstrappuna og dagføra vegin (mál 15/00790). Talan er um samlað tilboð fyri bæði arbeiðini, sí j.nr. 15/00790

Sp/f Andrias Berg hevur lægsta tilboðið áljóðandi kr. 2.344.767,00.

Articon hevur næstlægsta tilboðið áljóðandi kr. 3.208.235,00.

J&K Petersen hevur boðið sær at gera arbeiðið fyri kr. 3.422.178,00.

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri mælir til at taka av lægsta tilboðnum hjá Sp/f Andriasi Berg og viðvíkjandi arbeiðinum at gera uppihaldstrappuna at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndni og játta kr. 2.737.919 við MVG av kto. 6275 fyri miðbýarætlanina og at beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevnd 18. marts 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið i býráðið.

**Býráðsfundir 19. mars 2015:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sum kunnugt hava fleiri trupulleikar verið við Uppihaldstrappuni í Vágsbotni og dagføring av vegi niðan á Bryggjubakka, sum hava havt seinkingar við sær. Hetta hevur eisini havt meirkostnað við sær. Grótveitarin hevur ikki megnað at fáa tilfarið fram til tíðina, við tí avleiðing, at meirútreiðslur hava verið fyri arbeiðstakara og byggiharra. Arbeiðið hevur ligið stilt eina tíð, men er nú byrjað aftur, og grót er niðurfyri. Eisini hevur trappuprosjektið skula broytt og tillagað seg gjøgnum byggitíðina við viðmerkingum og krøvum frá Fornminnisnevndini. Ein loysn tykist nú endiliga verða komin undir land.

Eisini hava meirútreiðslur verið av umleggingum av kaðalum og leiðingum í vegnum, sum man ikki var vitandi um áðrenn arbeiðið fór ígongd.

Talan er um tvær ymiskar verkætlanir, sum eru bodnar út saman og samstundis, og har sami arbeiðsgevari er á báðum verkætlanum.
Samlaða hækkingin fyri báðar verkætlanirnar er kr. 710.000,00 tilsamans. Torført er at gera upp nágreiniligt býti, men helvtarbýti verður mett at verða á góðari leið.

Krøv og broytingar frá Fornminnisnevndini, verða mett at verða kr. 300.000. Seinkingar frá grótveitara verður mett til 300.000,00 kr., her íroknað til- og avriggingar í sambandi við Voxbotn, ólavsøku og jól.
Broytingar av verandi kaðalleggingum, hevur ein meirkostnað á kr. 160.000 við sær.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at hækka játtanina við kr. 355.000,00 av 6275 – "Fríðkan av kommununi" og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. mars 2016:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein, Helena D. á Neystabø og Bjørghild Djurhuus, samtykti at taka undir við tilmælinum.
Ein minniluti, Jákup Dam, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 09. marts 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og játta kr. 355.000,00 av konto 6275, Fríðkan av kommununi, og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>17. mars 2016 | Blað nr.: 12874 | |
| | Formansins merki: | |

# 73/16 Glastak á perlutorg

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 15.06.2015 | 153/15 | 15/01982-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 09.11.2015 | 217/15 | 15/01982-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 11.11.2015 | 272/15 | 15/01982-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 13.01.2016 | 7/16 | 15/01982-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 10.02.2016 | 25/16 | 15/01982-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 02.03.2016 | 77/16 | 15/01982-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 09.03.2016 | 98/16 | 15/01982-1 |
| 8 Býráðsfundur | | | 15/01982-1 |
| 9 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 73/16 | 15/01982-1 |

**Málslýsing:**
Nú virksemið bæði í Perluni og Reinsarínum sum samlað tónleika- og mentanarstað hevur virkað eina tíð, er hugskot um at fáa skipað uttanduraøkið uppí við at tekja útyvir.

Royndir eru gjørdar við fyribils konstruktiónum og takdúki. Møguleiki er eisini at gera permanenta stálkonstruktión við herdaðum glasi. Gjørt er uppskot tí viðvíkjandi, og sum mett verður kostar um 1 mió kr.

Uppskotið verður lagt fram. Byggi- og býarskipanarnevndin skal góðkenna staðseting.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til,

- at gjørd verður visualisering av uppskotinum,
- at heita á teknisku fyrisiting um at viðgera aðrar møguleikar fyri loysnum, sum eisini kunnu liva upp til ynsktu endamálini, og
- at leggja hetta aftur fyri mentamálanevndina til støðutakan.

**Mentamálanevndin 15. juni 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Málið hevur verið til viðgerðar hjá Teknisku fyrisitingini og býararkitektinum. Mett verður, at teltloysnin ikki hóskar so væl til nýtsluna av torginum ella til tiltøkini, sum verða skipað á torginum, og mælt verður til loysnina við glastaki. Býararkitekturin metir harumframt, at um býurin skal kunna gera gagn av torginum og veggjunum rundanum tað, er tað av stórum týdningi, at tað eitt nú er møguligt at sýna filmar og grafikk upp á veggirnar. Hetta er so at siga ómøguligt við teltloysnini. Somuleiðis kann man siga, at estetiskt hóskar glastakið væl til verandi Perlu og kann á henda hátt skapa meira harmoni, enn teltið hevði gjørt. Tó hevur glastakið ein vansa, at torgið altíð verður undir taki, og metir Býararkitekturin, at tað hevði verið til gagns fyri torgið, um takið varð gjørt soleiðis, at glasflaturnar kundu flytast/vippast, soleiðis at sólin ein sólskinsdag sleppur niður á torgið. Eisini verður mælt til, at áleggingin

(belegningurin) eigur at verða gjørd, sum víst í viðhefta tilfari, umframt at møblar/innbúgv og ljósseting eiga at verða hugsað inn frá byrjan av verkætlanini.

Hugsanin er at seta upp stálkonstruktión, sum verður takt við herdaðum glasi. Hjálagt eru tekningar, sum lýsa ætlanina.

Upplýsast skal, at verkætlanin hevur ikki verið viðgjørt í byggi- og býarskipanarnevndini, at umrøða staðseting.

Fyribils kostnaðarmeting er gjørd áljóðandi:

| | |
|---|---|
| Jørð – grevstur og stoyping av fundamenti: | 80.000 kr |
| Stál 4 stk stálkonstruktiónir: | 160.000 kr |
| Stálsperrur 15 stk: | 75.000 kr |
| Festir 4 stk/m2 x 140 $m^2$ | 120.000 kr |
| Glas (herdað/laminerað) 135 $m^2$ x 3500 kr: | 472.500 kr |
| Óvæntað 5%: | 46.000 kr |
| Tilsamans : | <u>973.000 kr</u> |

Kostnaðarmetingin er uttan kommununnar mvg á 6.25%

Hjáløgd eru 3 fylgiskjøl:
a). Plansjur við dømum um teltloysn og glastaksloysn
b og c). Tekningar yvir glastaksloysnina.

Víst er á møguleikan at fíggja hetta frá íløgujáttan, sum ætlað er til baðiland, men sum enn ikki er fyrireikað.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 1 mió. av íløgukontu 5775 Baðiland til verkætlanina og heimila umsitingini at gera sáttmálar innan fyri hesa játtan til at fremja verkætlanina.

**Mentamálanevndin 09. november 2015:** Nevndin tekur ikki undir við teimum uppskotum, til tak á torgið framman fyri Reinsarínum, sum fyriliggja í málinum.

**Fíggjarnevndin 11. november 2015:** Samtykt at beina málið aftur í mentamálanevndina til nýggja viðgerð.

**Ískoyti:**
Býararkitekturin hevur á fundi í januar við borgarstjóran og forkvinnuna í Mentamálanevndini víst á hvørjir býarskipanarligir møguleikar eru við einum torgið, sum er undir taki.

1. Sum partur av Mentunargøtuni vil torgið gerast meiri brúkiligt undir taki, og har kunnu skipast alskyns mentunarlig tiltøk. Nevnast kunnu listaframsýningar, filmframsýningar o.s.fr.
2. Harumframt kann torgið fevna um fyribils býarskipanarligar uppsetingar, sum býararkitekturin miðvíst arbeiðir fyri at skapa í miðbýnum, soleiðis at borgarin hevur tiltøk/uppsetingar at vitja í miðbýnum. Víst verður til viðløgdu myndir.
3. Til seinast skal nevnast, at økið víðkar um verandi virksemi í Perluni og Reinsarínum. Møguligt verður í størri mun at uppihalda sær á torginum, tá tiltøk eru í ávikavist Perluni og Reinsarínum.

Býararkitekturin kemur á fundin at leggja fram.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka støðu til uppskotið hjá býararkitektinum.

**Mentamálanevndin 13. januar 2016**: Nevndin mælir fyrisitingini til at arbeiða víðari við glastaksloysnini frammanfyri Reinsarínum og Perluni og venda aftur til nevndina við tíðar- og kostnaðarætlan.

**Ískoyti**
Tekstur kemur til fundin.

**Mentamálanevndin 10. februar 2016:** Útsett.

**Ískoyti:**
Tekniska fyrisitingin hevur saman við ráðgevanum P/F Nomatek greinað glastaksloysn og gjørt kostnaðarætlan, ið samstundis er eitt heildarveitingartilboð frá P/F Nomatek, ið takast kann av. Sí hjáløgd skjøl. Mett verður at arbeiðið kann verða framt innan umleið 4 mánaðir.

**Tilmæli**:
Trivnaðastjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at heimilað umsitingini til antin at taka av tilboðnum frá P/F Nomatek ella at heimila umsitingini at innganga avtalur um ráðgeving og fakentreprisur til at fremja verkætlanina innan ásetta karmin.

**Mentamálanevndin 02. marts 2016:** Samtykt at taka av tilboðnum frá P/F Nomatek og beina málið í fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Viðvíkjandi fígging til arbeiðið verður víst til tilmæli til fundin í mentamálanevndini 9. november 2015, sum er at játta kr. 1 mió. av íløgukarminum 5775 Baðiland.

**Fíggjarnevndin 09. marts 2016:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein, tekur undir við mentamálanevndini og beinir málið í býráðið at viðgera tvær ferðir.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á einum seinni fundi.

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Einmælt samtykt.

# 74/16 Verkætlan - Tørvur og strategi - bústaðarmøguleikar til eldri

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 30.11.2015 | 40/15 | 15/04601-1 |
| 2 Trivnaðarnevndin | 07.03.2016 | 11/16 | 15/04601-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 09.03.2016 | 103/16 | 15/04601-1 |
| 4 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 74/16 | 15/04601-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | | | 15/04601-1 |

**Málslýsing:**
Sum liður í umrøðuni, ið trivnaðarnevndin hevur havt av tørvinum á bústøðum, sum lagaðir eru til umstøðurnar hjá teim eldru, hetta samsvarandi eldrapolitikkinum, er í fíggjarætlanini verkætlanarjáttan kr. 1 mió sett av.

Sum fyrsta stig verður mett neyðugt at skipa eina verkætlan, sum lýsir tørv og møguleikar sum grundarlag fyri at gera langtíðarstrategi til tess at útvega hóskandi íbúðir og røktarbúpláss annars.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til umrøðu av arbeiðssetningi og skipan av verkætlan.

**Trivnaðarnevndin 30. november 2015:** Samtykt at heita á umsitingina um uppskot til arbeiðssetning og verkætlan til næsta fund.

**Ískoyti:**
Endamálið við verkætlanini er at fáa til vega haldgott grundarlag fyri langtíðarstrategi og politiskum raðfestingum til tess at útvega hóskandi mongd av eldrabústaðum, tað veri seg íbúðir, ið eru lagaðar til umstøðurnar hjá teim eldri við tí máli, at tað er betri møguligt at búgva heima sum longst (t.d. vardar leiguíbúðir við atknýttari heimatænastu), og røktarbúpláss.

Strategiin skal taka støði í demografisku broytingunum komandi 30 árini. Atlit skal eisini takast til mál um at tálma kommunala íløgu- og rakstrarkostnaðartørvin til bústaðir og røktartænastur.

Partur av íløgutørvinum er at nútíðargera ella endurútvega verandi ótíðarhóskandi búpláss. Annar partur er at útvega nýggj búpláss samsvarandi metta tørvinum framyvir bæði í mun til røktarbúpláss, demens, umlætting, rehabilitering v.m.

Viðvíkjandi alternativum bústøðum til eldri, tað veri seg vardar leiguíbúðir við atknýti til heimatænastu ella røktarheim, eldraíbúðardeplar e.líkn., er eisini spurningur, hvør kommunali leikluturin í mun til fígging at byggja hesar skal vera. Partur av hesum er meting um samstarvsmøguleikar.

Uppskot til arbeiðssetning:

1. Demografi

   a. Gerast skal framrokning av íbúgvaratali næstu 30 árini í aldursbólkunum 60+ og 85+ fyri Tórshavnar kommunu sum heild.
   b. Gerast skal samanberilig lýsing av lutfalsliga talinum av 60+ og 85+ í Tórshavnar kommunu við Norðurlond nú og fyri tey næstu 30 árini.
   c. Gerast skal samanberilig lýsing í mun til væntaðan miðal livialdur í Tórshavnar kommunu (ella Føroyum) við Norðurlond nú og tey næstu 30 árini.

2. Tørvur á stovnsplássi
   a. Gerast skal lýsing av verandi plásskapasiteti í Tórshavnar kommunu í mun til lutfall av eldri 60+ og 85+ samanborið við Norðurlond.
   b. Gerast skal lýsing av miðalaldri á teimum, sum hava búpláss í Tórshavnar kommunu, samanborið við Norðurlond.
   c. Gerast skal lýsing av, hvussu leingi hvørt búfólk í miðal býr á røktarheimi samanborið við Norðurlond.
   d. Gerast skal lýsing av mettum tørvi á búplássum næstu 30 árini við støði í:
      i. Demografisku broytingunum og verandi lutfalli av búplássum/eldri í Tórshavnar kommunu.
      ii. Demografisku broytingunum samanborið við verandi (og møguliga framtíðar) lutfall av búplássum/eldri í Norðurlondum.
      iii. Møgulig broyting av samanseting av búplássum næstu 30 árini, tvs. tal/lutfall vanlig røktarpláss, demenspláss, umlættingarpláss, samdøgursrehabiliteringspláss v.m.
   e. Gerast skal meting av íløgutørvi í búpláss komandi 30 árini, harundir at endurútvega verandi ótíðarhóskandi pláss.

3. Alternativir bústaðir til eldri røktarkrevjandi – íbúðir, íbúðardeplar v.m.
   a. Gerast skal lýsing av skipanum við eldraíbúðum/íbúðardeplum til røktarkrevjandi í Norðurlondum, har eldrarøktartænasta ella aðrar tænastur so sum dagtilhald ella annað er knýtt at.
   b. Gerast skal lýsing av, hvussu slíkar eru skipaðar rakstrarliga og fíggjarliga í mun til útvegan av íbúðum (íløga) og rakstur (leiguíbúð, eigaraíbúð v.m.).
   c. Gerast skal lýsing av føroyskari lóggávu á hesum øki, leiklutin hjá kommununi og møguleikar fyri samstarvi við aðrar aktørar, eitt nú Bústaðir, íleggingarstovnar v.m., og eyðmerkja møguligar forðingar.

4. Við støði í pkt. 1-3 skal gerast uppskot til strategi og íløguætlan komandi 30 árini.
   a. Partur av hesum er at geva ítøkiligt konseptuppskot til:
      i. Bygging av nýggjum røktarheimsplássum komandi 10 árini.
      ii. Bygging av alternativum bústøðum (íbúðir v.m.) til røktarkrevjandi, harundir samstarv við Bústaðir, aðrar íleggjarar v.m.

Uppskot til skipan av verkætlan:

a) Sett verður verkætlanarfólk undir leiðslu av trivnaðarstjóranum at standa fyri greiningararbeiðinum pkt 1-3 at vera liðugt ultimo august 2016.

b) Parallelt við hetta arbeiðið verður settur arbeiðsbólkur at gera ítøkilig uppskot til staðseting og konsept fyri bygging av røktarheimsplássum og íbúðum til røktarkrevjandi at vera liðugt ultimo august 2016.
   a. Bólkurin verður mannaður við umboðum fyri teknisku fyrisiting og trivnaðarfyrisitingina. Onnur kunnu takast inn í arbeiði eftir tørvi og keypast kann inn uttanhýsis ráðgeving.

c) Settur verður stýrisbólkur, ið er umboð fyri trivnaðarnevndina, fíggjarnevndina og stjórnina, at leiða og fylgja øllum verkætlanararbeiðinum.

Mett verður, at í fyrsta umfari er tørvur á kr. 500.000 til verkætlanarútreiðslur, harundir løn, ráðgeving, íblástur v.m.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at samtykkja omanfyri nevnda arbeiðssetning og skipan og at játta kr. 500.000 av íløgukontu 2775 eldrarøkt ætlað til endamálið.

**Trivnaðarnevndin 07. marts 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina. Harumframt samtykt at heita á byggi- og býarskipanar-nevndina um beinanvegin at vísa á uppskot til staðsetingar at byggja íbúðardepil við 20-30 bústaðareindum við felagsfasilitetum .

**Fíggjarnevndin 09. marts 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og játta kr. 500.000,00 av iløgukonto 2775, eldrarøkt, og beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Einmælt samtykt.

# 75/16 Bygginevndin fyri Hoyvíkar kirkju- kirkjugarður í Hoyvík (2007-2036)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2014 | 54/14 | 14/00772-13 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.01.2015 | 2/15 | 14/00772-13 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.02.2015 | 14/15 | 14/00772-13 |
| 4 Býráðsfundur | 26.02.2015 | 37/15 | 14/00772-13 |
| 5 Tekniska nevnd | 04.03.2015 | 32/15 | 14/00772-13 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.11.2015 | 243/15 | 14/00772-13 |
| 7 Fíggjarnevndin | 02.12.2015 | 312/15 | 14/00772-13 |
| 8 Býráðsfundur | 10.12.2015 | 245/15 | 14/00772-13 |
| 9 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.03.2016 | 74/16 | 14/00772-13 |
| 10 Fíggjarnevndin | 09.03.2016 | 105/16 | 14/00772-13 |
| 11 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 75/16 | 14/00772-13 |

**Lýsing av málinum:**

Í sambandi við fyrispurningar um nýggjan kirkjugarð í Hóyvík, hevur umsitingin gjørt uppskot til staðseting fyrr ávíst 5 ymiskar staðsetingarmøguleikar (j. nr. 2007-2037/4). Arbeitt hevur verið víðari við at kannað um eisini aðrir staðsetingarmøguleikar eru, og verður hervið víst á eitt økið afturat. Økið sum talan er um, liggur oman fyri sambindingarvegin millum Inni á Gøtu og framtíðar innkomuvegin til Tórshavn, sum framhald av Dalinum Langa.

**Byggisamtyktin:**
Verandi serstaka byggisamtykt fyri hetta økið varð gjørd í sambandi við býarpartin Stórutjørn. Stórur partur av økinum er D2 og har, sum hetta endar eystureftir, stingur ein kíli av 4. grundumráði, hagi, seg inn millum D2 og A3 bústaðarøkið Inni á Gøtu.

**Økiseyðkenni:**
Norður-suðurgangandi dalskap við norðurendan av Dalinum Langa. Dalurin ella lægdin liggur nakað burtur frá Sambindingarvegnum (Klingran) og eru góðir møguleikar at staðseta bygningar og parkeringsøki skamt frá vegnum. Í lívd av eysturhallandi skráa liggur vesturhallandi slætti við stórbærum útsýni norðureftir móti Sundalagnum og tí vakra Skálafirði.

**Nærøkini:**
Økið liggur vart og er ikki áloypandi í lendinum, millum 5 og 20 metur hægri enn bústaðarøkið Inni á Gøtu, og partvís afturundir lítla heygnum millum bæði økini.

**Víðkanarmøguleikar:**
Samlað økisvídd er 25.000 m², og góður møguleiki er at byrja við 3.500 - 5000 m² í lægdini undir brekkuni, fyri síðan at víðka norðureftir.

**Atkomuviðurskifti:**
Tætt við sambindingarveg, ið kann leiða nógva bilferðslu. Siðvenjan at ganga í gravarfylgi er komin til eitt vegamót, men eru her møguleikar, tí í beinari linju eru 950 m til kirkju og samkomuhús ígjøgnum fríøkið Dalurin Langi. Til sammetingar er beina leiðin millum Dómkirkjuna og kirkjugarðin við Velbastaðvegin 1250 m.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Ongin fígging er avsett til nýggjan kirkjugarð í Hoyvík. Útvegan av kirkjugarði í Hoyvík er ikki átrokandi, við tað at verandi kirkjugarður í Tórshavn hava nøktandi pláss enn.

**Niðurstøða.**
1. Kirkjugarður á hesum stað vil ikki ávirka verandi býarbygging.
2. Tað er av týdningi at kirkjugarðurin kann víðkast.
3. Kirkjugarðurin kann vera partur av frílendisætlan fyri býarbygging í Hoyvíkshaganum.
4. Siðvenja er at leggja kirkjugarðar uttanfyri býir og bygd øki, fyri síðan at býurin nærkast og at enda fevnir um økið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin tekur støðu til staðsetingarmøguleikar út frá fyriliggjandi uppskotum, og um arbeiðast skal víðari við málinum, og um so er, at játtað pening til fyrireikingar, herundir kanningar og projektering av skitsuuppskotinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 8. februar 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við staðsetingini, sambært kortskjali dagfest 03.02.2010.

Formaðurin hevur ynskt málið á skrá til ummælis

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. juni 2012:** Kunnað var um málið.

**Ískoyti:**
Um arbeiðast skal víðari við málinum, kann víðari gongdin í málinum verða:

1. Keyp av lendi
   Keyp av lendi 25.000 $m^2$ av matr. 135ed Hoyvíkshagi 3,5 mill.
2. Gerð av forprojekti
   Gera forprojekt til myndugleikaviðgerð
3. Borgarakunning
   Hava kunningarfund fyri borgarunum í Hoyvík
4. Myndugleikagóðkenning, friðingarnevndir, Føroya Stift
   Náttúru- og yvirfriðingarnevndarloyvi og loyvi frá Føroya Stift, kunngerð um kirkjugarðar.
5. Projektering/útbjóðingartilfar og útbjóðing
   At bjóða út til tvey projekterandi feløg at projektera, gera útbjóðingartilfar, bjóða út og hava lisitatión
6. Tíðarætlan
   Tíðarætlan keyp av lendi medio 2015, loyvir ultimo 2015, projektering og útbjóðing medio 2016 arbeiði kann byrja aftaná summarfrítíðina 2016.

Peningur er tøkur á karminum 6575 fyri 2014, men onki er játtað, til víðari arbeiði við málinum. Eingin fíggjarkarmur er avsettur á íløgum 2015.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir nevndini til at taka støðu til, um verkætlanin skal setast í verk eftir leistinum sum skotin er upp, og um neyðugur fíggjarkarmur skal játtast til verkætlanina komandi ár, fyri 2016.
Verður avgjørt at arbeiða víðari við málinum, skal málið til teknisku nevnd til viðgerðar og fíggjarnevndina til samtyktar at leggja fyri býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2014:** Kunnað varð um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. januar 2015:** Útsett til komandi fund, tá tað verður lýst og framlagt í sambandi við staðsetingina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. februar 2015:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Halla Samuelsen, samtykti at taka undir við staðsetingini, sambært kortskjali dagfest 03.02.2010.

Ein minniluti, Jákup Dam, tekur støðu á seinni fundi.

Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundir 26. februar 2015:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Rúni Djurhuus, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Jógvan Arge.

Greiddi ikki atkvøðu: Jan Christiansen.

**Tekniska nevnd 04. mars 2015**: Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Býarskipanardeildin hevur gjørt kravfestingar til málið um kirkjugarðin í Hoyvík, sí hjálagda skjal. Fyrsta byggistig fevnir um gerð av lendi til 320 gravir, at skipa atkomuveg og parkeringspláss til 72 bilar, at byggja lítið arbeiðshús til amboð og uppihald. Umframt at garðurin skal girðast inni.

Kravfestingarnar siga, hvussu nýggi kirkjugarðurin ynskist skipaður. Kravfestingarnar eru grundskjal undir uppskoti til skipan, projektering, myndugleikagóðkenning/Føroya Stift, friðingarviðgerð, og til løgdeildina at fyriskipa og fremja keyp av lendi frá Búnaðarstovuni. Ætlan er at bjóða projekteringina út í innboðnari lisitasjón. Tilboðini verða løgd fyri nevnd aftur, tá tey eru innkomin.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka undir við kravfestingarskjølunum, at bjóða projekteringina út, og at beina málið til løgdeildina at keypa lendi.
Mælt verður eisini til at játta kr. 500.000,- av karminum á konto 6275 Kirkjugarðar.
**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. november 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
**Fíggjarnevndin 02. december 2015:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.
**Býráðsfundur 10. desember 2015:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Kirkjugarðurin í Hoyvík hevur verið úti í kapping, har tvær ráðgevarafyritøkur vórðu bidnar um at koma við einum skipanaruppskotið til nýggjan kirkjugarð í Hoyvík, umframt tilboði upp á ráðgevarakostnað fyri 1. byggistig. Skipanaruppskotið varð vektað við 25% og ráðgevarakostnaðurin varð vektaður við 75%.

Fríggjadagin 26. februar 2016 komu undirhondsboðini frá tveimum ráðgevarafyritøkum inn.

Kostnaðarstøðið fyri ráðgevingina av 1. byggistigi var høgt og var eisini stórur munur millum tey tvey tilboðini, sum vórðu latin inn. Harumframt vóru kostnaðarmetingarnar fyri bygging av byggistigunum eisini høgar, og sostatt metti dómsnevndin, mannað av umsitingini, at vegna høga kostnaðarstøði, er ikki ynski at taka av nøkrum av tilboðunum, men heldur lata Býarskipan arbeiða víðari við verkætlanini, at gera skipanaruppskot, projekt og føra verkætlanina fram til útbjóðingar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at samsýna bjóðarunum kr. 25.000 í part fyri luttøkuna, og at býarskipan arbeiðir víðari, at gera skipanaruppskot, projekt og føra verkætlanina fram til útbjóðingar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. mars 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Einmælt samtykt.

# 76/16 Umsókn frá Eysturskúlanum um játtan at keypa 27 fót glastrevjabát

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 07.04.2015 | 65/15 | 14/05223-3 |
| 2 Mentamálanevndin | 02.03.2016 | 65/16 | 14/05223-3 |
| 3 Fíggjarnevndin | 09.03.2016 | 95/16 | 14/05223-3 |
| 4 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 76/16 | 14/05223-3 |
| 5 Býráðsfundur | | | 14/05223-3 |

**Málslýsing**:
Í umsókn dagfest 24. november 2014 søkir Eysturskúlin um játtan at keypa glastrevjabát.

Á sjóvinnubreytini í Nám X hava næmingar, sum hava áhuga fyri okkara høvuðsvinnu og áhuga sjóvinnu sum lívsstarv, møguleika at nema sær átøðiliga og praktiska vitan og royndir.

Sjóvinnubreytin í Eysturskúlanum er býtt í tveir partar, annar er sjógvurin og praktisk læring, hin er ástøðilig undirvísing.

Í praktiska partinum læra næmingarnir um sjómansskap, og tá tað viðrar eru teir á floti og hava møguleika at royna ymsan reiðskap.

Ástøðilgi parturin er undirvísing, sum er skipað av lærarum í Vinnuháskúlanum og við skúlaárslok hava næmingarnir møguleika at fáa prógv fyri frítíðarsiglarar. Aftrat hesum fáa næmingarnir trygdasrskeið.

Samanumtikið er undirvísingin á sjóvinnubreytini í Nám X fjølbroytt og førleikagevandi.

Praktiski parturin á sjónum er treytaður av, at næmingar hava atgongd til bát. Eysturskúlin hevur í løtuni atgongd til tríggjar bátar, men teir eru allir privatogn, og tveir teirra eru ikki so væl egnaðir til endamálið. So í grundini er bert tann eini báturin, men tað fer ikki at halda fram, tí hann er privatogn, og eigarin skal eisini sjálvur brúka bátin. Um skúlin ikki hevur atgongd til bát, verður sjóvinnubreytin nógv skerd.

Eysturskúlin hevur vent sær til Bátafelagið, men útlitini at fáa avtalu um at brúka ein bát, sum altíð er tøkur, tá skúlin skal brúka hann, eru ikki góð. Skúlin hevur søkt um stuðul frá Kiwanis og Lions, og hevur fingið svar frá báðum, at feløgini ikki kunnu lata stuðul til endamálið, tí umsóknin liggur uttan fyri virkisøkið hjá teimum.

Eysturskúlin søkir um heimild og stuðul at ogna sær bát til Nám X. Báturin skal í minsta lagi vera 27 føtur, vera frambygdur og hava dekk. Kostnaðurin fyri ein tílíkan glastrevjabát er 150.000 – 200.000 kr.

Skúlaárið 2015/2016 hava 25 næmingar søkt inn á sjóvinnubreytina í Nám X.

Skúlin átekur sær vanliga røkt og rakstrarútreiðslur av bátinum.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til ikki at játta stuðul til endamálið, men mæla skúlanum til at fáa í lag avtalu um atgongd til bát ella bátar, sum hóskar til undirvísingarvirksemið.

**Mentamálanevndin 07. april 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Mentamáladeildin og Eysturskúlin hava roynt at funnið loysn viðvíkjandi brúksrætti til ein bát til sjóvinnubreytina í Nám X, men tað er ikki eydnast at finna nakran, sum er sinnaður at gera avtalu um nýtslu av báti, sum skal vera tøkur hjá sjóvinnubreytini, allar teir dagar, ið breytin skal brúka bát.

Umsitingin hevur sett seg í samband við Tórshavnar Havn við fyrispurningi um at brúka ein bát, sum havnin brúkar í sambandi við ymiskt arbeiði í havnini. Men tann báturin er ikki egnaður til endamálið.

Fram er so ein annar møguleiki, men skúlin metir ikki, at hann ikki er ein bátur, sum kann brúkast til sjóvinnubreytina í Nám X.

Komandi skúlaár hevur Sjóvinnubreytin í Nám X ikki atgongd til nakran bát, og um eingin loysn er, ber ikki til at hava breytina, og hon verður so ikki ein valmøguleiki. Breytin er vælumtókt, og báturin er í grundini fakhøli hjá sjóvinnubreytini, eins og køkurin er fakhøli hjá húsarhaldsbreytini.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta Eysturskúlanum 200.000 kr. til keyp av glastrevjabáti av kontu 5370 stuðul til íløgur.

**Mentamálanevndin 02. marts 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Nevndin vil hava málið eftirmett eftir eitt skúlaár.

**Fíggjarnevndin 09. marts 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og játta kr. 200.000 sum eykajáttan av konto 5370 á konto 4118 og at beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Einmælt samtykt.

## 77/16 Tórshavnar kommuna yvirtekur leigumál millum Kiwanis Tórshavn og Kiwanis Rósan sum eigari og Almanna- og heilsumálaráðið vegnað Nærverkið sum leigara.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 10.06.2015 | 160/15 | 15/01854-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 09.03.2016 | 97/16 | 15/01854-2 |
| 3 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 77/16 | 15/01854-2 |

**Málslýsing**:
Tórshavnar kommuna (Heilsu og umsorganartænastan) yvirtekur verandi leigusáttmála, sum er millum Eigaran, Kiwanis Tórshavn/Kiwanis Rósan og leiðaran, sum er Heilsumálaráðið vegna Nærverkið.

Leigumálið umfatar ovaru hædd (veghæddina) í Felagshúsinum hjá Kiwanis í Jøkulstræti 4, til støddar 165m$^2$.

Leigan er kr. 132.000 árliga svarandi til kr. 11.000 um mánaðin. + el og olju.

Sambært grein 4. stendur um nýtslu, at hølini skulu nýtast til dagtilhald til eldri fólk, og má ikki nýtast til annað endamál, uttan at eigarin skrivliga samtykkir.

Verandi eigari góðtekur at kommunan yvirtekur leigusáttmálan til galdandi treytir.

**Tilmæli**:
Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini mæla til at skriva nýggjan sáttmála til kommunalar treytir/orðingar, sí uppskot til sáttmála skjal nr. 15/01854–3.

**Fíggjarnevnd 10. juni 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti.**

Víst verður til frágreiðing frá fundi millum Tórshavnar kommunu og Kiwanis frá 01.02.2016. ( 15/01854-8 )

Kiwanis vísir á, at verandi leiguavtala er frá 2007, t.v.s. er gjørd fyri 9. árum síðani, og at leigan ongantíð er regulerað.

Verandi leiga  er kr. 11.000 pr. mðr. ( 800 kr/m2. pr. ár. )

Kiwanis ynskir, at leigan verður regulerað upp til kr. 12.000 pr. mðr ( 872,72 kr/m2. pr. ár ) og at leigumálið verður óuppsigiligt í 5 ár.

Trivnaðarstjórin og leiðarin í sosialu deild mæla til at regulera leiguna til 850 kr/m2. pr. ár, og at leigumálið verður óuppsigiligt í 5 ár.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at góðkenna leigusáttmálan.

Leigan verður kr. 11.687,50 pr. mðr ( kr.  850 kr/m2. pr. ár )  og verður leigumálið óuppsigiligt 5. tey fyrstu árini eftir, at leigusáttmálin er undirskrivaður av nýggjum.

Sí sáttmála 15/01854 - 9

**Fíggjarnevndin 09. marts 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Einmælt samtykt.

# 78/16 Avtøka av serstøku byggisamtykt nr 12

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.03.2016 | 72/16 | 16/01163-1 |
| 2 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 78/16 | 16/01163-1 |

**Málslýsing:**
Serstaka byggisamtykt nr. 12 er skipan av økinum millum Tróndargøtu, Sjúrðargøtu, Tórsgøtu og Niels Winthers gøtu. Økið er sundurbýtt í tríggjar eindir.

1. Eindin A er løgd til blandaða bústaða og miðstaðabygging
2. Eindin B er løgd sum almennur urtagarður – Grasagarður
3. Eindin C er løgd sum almennur stovnur – kommunuskúlin

Ì eindini B, Grasagarður, eru skipaðar spæliumstøður fyri smærri børn v.m. Broyttu umstøðurna gera, at økið ikki kann kallast fyri almennur urtagarður meira.

Kommunuskúlin er niðurlagdur sum skúli og skal í framtíðini gerast til lestraríbúðir, mentanarligt høli, spælipláss v.m.

Í almennu byggisamtyktini liggur økið í 2. grundumráði, sum er ætlað til blandaða bústaða- og miðstaðabygging.

Býarskipanardeildin metir, at serstaka byggisamtyktin ikki er rúmar ætlaðu byggingini í økinum, men øll verandi og ætlandi byggingin í økinum kann rúmast í 2. grundumráði. Tí verður mælt til at avtaka serstøku byggisamtykt nr. 12.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at serstaka byggisamtykt nr. 12 verður avtikin og økið verður 2. Grundumráði.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. mars 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreassen og Sjúrður Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Marin Kathrina Frýdal

# 79/16 Umsókn um byggiloyvi til skúr/úthús á matr. nr. 135hi, Hoyvík.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.03.2016 | 64/16 | 15/00994-8 |
| 2 Fíggjarnevndin | 09.03.2016 | 108/16 | 15/00994-8 |
| 3 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 79/16 | 15/00994-8 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.04.2016 | 83/16 | 15/00994-8 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Búgvi D. Heinesen søkir um frávik frá áseting í skeytinum viðv. byggiøkinum til bilhús og frá ásetingunum um hæddarviðurskifti í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Talan er um eitt bilhús, sum verður 6,2 m langt, 5,6 m breitt, 2,7 m høgt, 34,72 $m^2$ til víddar og staðsett 3,25 m frá suðurmarkinum við innkoyring frá norðuri
Bilhúsið verður í stóran mun staðsett á byggiøkinum ætlað sethúsinum við eini atkomu sum ikki er sambært skeytisásetingunum.

Búgvi grundgevur soleiðis fyri, hví tað ikki ber til at halda seg innanfyri ásetingarnar í skeytinum:

1. Húsini eru flutt 1,5 m suður, tí norð-vestur hornið á stykkinum er sneitt, so ikki bar til at byggja sum upprunaliga ætlað.
2. Ov lítið pláss er sunnan fyri húsini, bert uml. 4,4 m.
3. Jarðarmunurin í brekkuni vestan fyri húsini ger innkoyringina sera trupla, tí stórt hall er bæði suðureftir og vestureftir.
4. Fjarhitarørini, kloak- og avløbsrør og allar aðrar innføringar til húsini liggja bert uml. 2 m frá vegnum.
5. Sum fjarhitarørini liggja, ber ikki til at halda forskriftina fyri tey viðvíkjandi dýpinum, sum tey skulu liggja undir jørð, fyri at kunna koyra omaná teimum.

Umsøkjarin hevur gjørt sær innkoyring frá norðursíðuni og annars stoypt sær garð uppfyri skeytisásettu innkoyringina í Bertugøtu (sí mynd 01 og mynd 02).

Matr. nr. 135hi liggur uml. 1,5 m hægri enn grannamatrikulin 135hk, sí mynd 02, og vil ætlaða staðsetingin av bilhúsinum koma at hava eina størri ávirkan á grannastykkið enn um bygt var innanfyri ásetta byggiøki, serliga í mun til ljósviðurskiftini (sí mynd 03 og mynd 04).

Kommunan hevur tó í einum øðrum føri loyvt, at bygt verður eitt bilhús, sum í síni heild liggur uttanfyri byggiøki, sí mál 2011-1279. Her er tó talan um eina planering, sum liggur lutfalsliga lágt í mun til grannastykkini (sí mynd 05).

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í umráðispartinum A3 í 3. grundumráðið í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, har tað er ásett í kap. IV, § 7:

1. Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.
2. Útstykkingar kunnu bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.

Harafturat eru ásetingar í skeytinum viðv. staðsetingum, hæddum, byggilinjum, byggiøkjum v.m.
Tórshavnar kommuna hevur átalurætt

**Upplýsingar frá umsitingini**
Fyri 300 m² grundstykkini í Hoyvíkshaganum suður, eru ásetingar settar í skeyti og eitt fylgiskjal, ið vísir hvar byggingin skal verða innanfyri. Hetta er gjørt við atliti til at stykkini ikki eru so stór og at útstykkingin skal verða nøkulunda eins og í samsvari við galdandi reglur/brunareglur.

Tað eru tó húsaeigarar, sum hava fingið loyvi til at byggja út um byggifeltini og aðrir sum hava fingið at vita, at teir skulu halda seg innanfyri ásetingarnar.

Um frávik skal gevast, krevur tað loyvi frá fíggjarnevndini, tí talan er um ásetingar, sum eru tinglýstar í skeytinum, harumframt skal málið eisini til grannahoyring viðv. frávikum í mun til byggisamtyktina.

Umsøkjarin hevur fingið frávik frá at byggja sethúsini í byggilinjuna í ein útnyrðing (j.nr. 2006-1904) orsakað av hornaavskurðinum og er frástøðan í mark tískil 2,25 m í mun til 1,25, sum er ásett í skeytinum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Mál nr. 2012-1571: Búgvi Heinesen søkir um byggiloyvi til eitt líknandi bilhús og fekk noktandi svar við fylgjandi grundgevingum:

- Vísandi til fylgiskjalið til skeytið, er eitt byggiøkið sett av til bilhús/hjall. Bygningurin er ikki settur innanfyri hetta økið.
- Vísandi til fylgiskjalið til skeytið, er víst hvønn veg innkoyringin til grundstykki er, innkoyringin er til Bertugøtu. Tí kann innkoyringin ikki verða frá vístu síðu.
- Hæddin á bilhúsinum er yvir 3 m, mest loyvda hædd er 2.5 m í mark, tá ið fráleikin er minni enn 2,5 m. Víst verður til almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu, kap. 4, § 26, stk. 6b.
- At veggurin móti marki er úr træ og ikki eldverjuveggur, tvs. betong, Víst verður til almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu, kap. 4, § 26, stk. 6f.
- Bilhús og úthang skal verða innan fyri egið mark. Úthangið er út um mark.

Onnur sum hava fingið loyvi at byggja út um byggifeltið:

1. Mál nr: 2011-1475: Bergur Joensen, Gortrugøta 3, hevur í juli 2012 fingið loyvi til eitt bilhús sum er 5 x 7 m, við høgari reising, har partur av bilhúsinum er uttanfyri byggifelti.
2. Mál nr. 2005-0684: matr. nr. 135 it, Djóni í Geil, Gortrugøta 5, hevur í juni 2005 fingið byggiloyvi til bilhús 4,7 x 8 m við høgari reising. Bilhúsið er 0,7 m uttanfyri byggifeltið.
3. Mál nr.: 2011-1279: Matr.nr. 135hz, Hildur Poulsen, Gortrugøta 30, hevur í mars 2012 fingi loyvi at byggja uttan fyri byggifelti. Aftanfyri húsið.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Staðsetingin er ikki í tráð við ásetingarnar í skeytinum.

Hæddin er uml. 2,7 m í mark, har mest loyvda er 2,5 m. Víst verður til ásetingina í almennu byggisamtyktini kap. III, § 27, stk. 5, b) har tað er ásett:
*«Bygningurin má ikki upp til 2,5 m frá grannamarki vera hægri enn 2,5 m».*

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>17. mars 2016 | Blað nr.: 12892 |
| | Formansins merki: |

**Umhvørvisárin**
Viðgjørt eftir umhvørvisstigið 1

**Fíggjarlig viðurskifti**
Ongar bindingar fyri kommununa

**Viðmerkingar frá øðrum deildum**
Ongar viðmerkingar.

**Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum**
Ongar viðmerkingar.

**Skjøl**

| | |
|---|---|
| Umsókn um frávik | 15/00994-5 |
| Tekningar – Búgvi Heinesen, Bilhús | 15/00994-5 |
| Skeyti, 300 $m^2$ | 15/00994-7 |
| Mynd 01 - Skeytisásett innkoyring | 15/00994-7 |
| Mynd 02 - Skeytisásett innkoyring | 15/00994-7 |
| Mynd 03 – innkoyring sum er í nýtslu | 15/00994-7 |
| Mynd 04 – innkoyring sum er í nýtslu | 15/00994-7 |
| Mynd 05 – Bilhús uttanfyri byggiøki | 15/00994-7 |
| Kortmynd | 15/00994-7 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla frá at loyva frávikinum og mæla til at beina málið í fíggjarnevndini til støðutakan, um kommunan ynskir at gera átalurættin galdandi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. mars 2016:** Samtykt at senda málið til grannahoyringar og um eingi mótmæli koma, at geva loyvi og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 09. marts 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at loyva umsøkjaranum frávik frá skeytisásetingunum, um eingi mótmæli koma móti ætlaðu byggingini.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Einmælt samtykt.

# 80/16 Sp/f Bilrøkt. Fyrispurningur um keyp av parti av matr. nr. 1070a.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.01.2016 | 27/16 | 14/00671-16 |
| 2 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 24/16 | 14/00671-16 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.03.2016 | 73/16 | 14/00671-16 |
| 4 Fíggjarnevndin | 09.03.2016 | 107/16 | 14/00671-16 |
| 5 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 80/16 | 14/00671-16 |

**Málslýsing:**
**Umsókn um keyp av øki.**

Sp/F Bilrøkt Fastogn, søkir um at kunna keypa uml. 850 m$^2$, burtur av matr. nr. 1070a, Tórshavn, at leggja saman við egnari ogn matr. nr. 1076m, Tórshavn.

Felagið rekur bilverkstað og bilsølu á matr. nr. 1076 m, sum er til víddar 2.299 m$^2$.
Samlaða víddin verður hereftir uml. 3.149 m$^2$.

Endamálið við keypinum, er at fáa betri pláss til virksemið.

**Tilmæli:**
Leiðarin á løgdeildini og kommunustjórin mæla til at beina málið í teknisku nevnd.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
**Viðmerking frá teknisku deild:**
Matrikul 1070a, sum søkt verður um, liggur í umráðisparti B3 og D1 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Umleið 320 fermetrar liggja í B3 økinum og restin í D1 øki.

Víst verður til Glyvursvegin, kort j.nr. 2013-0141/5, sum kemur fram við ognini hjá Bilrøkt, víst verður eisini til hæddarmunin millum lidna gongu- og súkklubreyt og verandi lendi á ognini. Um kommunan selur part av matr. 1070a er umráðandi, at kommunan tryggjar sær rætt at seta skráa til møguliga planting, tá vegurin er liðugur.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggideildini mæla til, at S/p Bilrøkt Fastogn kann keypa umleið 320 fermetrar, sum liggja innan fyri B3 økið í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum er ein partur av økinum, ið teir brúka at seta bilar á sum nú er, og at bíða at taka støðu til restina av økinum, til vegurin er liðugur út á Argir, treytað av góðkenning frá Innlendismálaráðnum og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 12. juni 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. juni 2013:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið við tilmæli um at selja umsøkjaranum lendið fyri 600 kr./m² við góðkenning frá Innlendismálaráðnum.

**Býráðið 26. juni 2013: Einmælt samtykt.**
Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av máli 2013-0141.

**Ískoyti:**
Sp/f Bilrøkt søkti upprunaliga um at keypa 850 $m^2$.
Býráðið samtykti í fyrsta umfarið at selja umleið 320 $m^2$, fyri 600 kr./$m^2$, og at fylgja tilmælinum frá tekniska stjóra, um at bíða við at taka støðu til møguliga sølu av restini av umsøkta økinum, til vegurin er liðugur út á Argir.

Umhvørvisstovan avgreiddi frábýtið 19.09.2014. Tá ið frábýtið/sølan varð endaliga framd var økið uppmált til 296 $m^2$.

Bilrøkt hevur í desember 2015, sent kommununi umsókn um at viðgera upprunaliga keypsmálið av nýggjum og søkir um at keypa írestandi 550 fermetrarnar.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. januar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Lendið, sum søkt verður um at keypa, liggur í D1-frílendi í almennu byggisamtyktini og tað sama ger vegurin til brúnna. Umsitingin metir at best er at bíða við at broyta byggisamtyktina til vegurin til brúnna er frámatrikuleraður, so kann byggisamtyktin broytast allan vegin vestan fyri marki til vegin oman til vegin í Vika.

Onnur viðurskifti eru, at partur av teimum 550 $m^2$, sum søkt verður um at keypa, liggur úti á vegnum og umsøkjarin longu brúkar uml. 200 $m^2$ av lendinum, sum ynskt verður at keypa.

Á fundi við umsøkjaran, Heina á Borg, greiddi hann frá, at ætlanin var at byggja ein framsýningarbygning fram við eystursíðuni á verandi bygningi og snøgga um økið ímóti vegnum.

Avtalað var við umsøkjaran, at mæla fíggjarnevndini til at gera eina brúksavtalu við keypsrætti til teir uml. 200 $m^2$, sum umsøkjarin longu brúkar, og taka málið upp aftur tá ið øll viðurskiftini við vegin, matrikulering og byggisamtykt eru liðug.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at bíða við sølu av lendi fram við vegnum til brúnna til øll viðurskiftini við matrikulering og byggisamtykt eru liðug, men heldur at gera eina brúksavtalu við keypsrætti fyri teir uml. 200 $m^2$, sum umsøkjarin longu brúkar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. mars 2016:** Samtykt selja Bilrøkt eitt hóskandi øki upp til 300 fermetrar og at heita á Umhvørvisstovuna at matrikulera økið sum skjótast, soleiðis at byggiloyvið kann avgreiðast. Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 09. marts 2016:** Samtykt at selja upp til 300 fermetrar fyri 600 kr./$m^2$ og beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Einmælt samtykt.

# 81/16 Umhvørvisstovan : Umsókn vegna Elin Reinert Planck og Óli Reinert um sundurbýti av matr. nr. 1050b, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 26.05.2014 | 160/14 | 14/02295-2 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.03.2016 | 77/16 | 14/02295-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 09.03.2016 | 110/16 | 14/02295-2 |
| 4 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 81/16 | 14/02295-2 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Umhvørvisstovan biður um ummæli vegna Elin Reinert Planck og Óla Reinert um at sundurbýta matr. 1050b til tvey grundøkir.
Á matr. 1050b, sum hevur adressu landavegur 113, standa eini sethús, sum tey vilja hava sundurbýtt frá, í tveir matriklar.
Grundøkið, talan er um, er umleið 1220 fermetrar til støddar, og vilja tey sundurbýta soleiðis, at hvørt stykki verður umleið 600 fermetrar til støddar.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Matr. 1050b liggur í umráðispartinum A1 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

**§ 5. Ásetingar fyri umráðispartarnar A1 í 3. grundumráði**
1 Loyvt er einans at byggja stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð, og – eftir serloyvi frá byggivaldinum – tvíhús og raðhús og tilíkar bústaðir fyri eitt húski.

Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.

2 Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 500 m². Tá byggingin verður framd eftir serstakari byggisamtykt, kann býráðið loyva, at grundstykkini eru minni enn 500 m², tó í minsta lagi 400 m² fyri stakhús og 300 m² fyri hvønn partin av einum tvíhúsum ella raðhúsum. Ein partur av teirra minstuvídd kann verða lagdur sum felagslendi og sum bilstøðil.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Einki liggur til hindurs fyri sundurbýtinum

**Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum:**
Ongar viðmerkingar

**Skjøl:**14/02295-3

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Onki

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

ongar

**Fíggjarlig viðurskifti**
Ongar

**Viðmerkingar frá øðrum deildum**
Tekniska deild einki liggur til hindurs fyri at sundurbýta matr. 1050b.

**Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum**

**Skjøl**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini viðmæla at sundurbýta matr. 1050b til tvey grundøkir, treytað av at bæði stykkini fáa eina felags inn- og útkoyring og at hetta verður lýst sum servituttur á bæði skeytini.

**Tekniska nevnd 26. mai 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Formaðurin ynskir málið á skrá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. mars 2016:** Samtykt at strika servituttin og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 09. marts 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Einmælt samtykt.

# 82/16 Meirjáttan til konto 8114 í sambandi við keyp av salti til goymsluna

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 02.03.2016 | 34/16 | 16/01132-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 09.03.2016 | 106/16 | 16/01132-1 |
| 3 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 82/16 | 16/01132-1 |

**Málslýsing:**
Eftir áhaldandi vetrarveður við temperaturi millum -1 og +4 gradir, má staðfestast, at brúk er fyri salti til goymsluna hjá vetrartænastuni.

Kommunan hevur fingið eitt tilboð frá Saltsøluni, sum hevur uml. 2.500 tons av salti liggjandi á goymslu. Hetta saltið hevur ikki bestu góðsku sum matsalt og tí er Saltsølan komin við einum tilboði til kommununa.

Um kommunan keypir 1.500 tons ella meir, kann hetta keypast fyri kr. 590 pr. tons. Sostatt kann kommunan útvega sær uml. 1.700 tons fyri uml. 1 mió. kr. og kann hetta spara kommununi fyri millum kr. 195 – 325.000,- alt eftir hvussu nógv verður keypt. Treytin er tó, at kommunan keypir í minsta lagi 1.500 tons.

Goymslutunnilin hjá kommununi við Oyggjarvegin, sum nú er tómur, rúmar uml. 2.000 tons.

Eftir sum fígging til endamálið ikki er tøk á konto 8114 til restina av árinum, verður neyðugt at taka avgerð um hvussu keypið skal fíggjast.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla teknisku nevnd til at útvega játtan til fíggingina.

**Tekniska nevnd 02. mars 2016:** Samtykt at heita á fíggjarnevndina at játta 1 mió. kr. til keyp av salti.

**Fíggjarnevndin 09. marts 2016:** Samtykt at játta kr. 1 mió. av konto 8112.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Einmælt samtykt.

## 83/16 Ferðslutrygdarætlan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 05.02.2014 | 1/14 | 14/00614-13 |
| 2 Ferðslunevndin | 19.02.2014 | 9/14 | 14/00614-13 |
| 3 Ferðslunevndin | 26.02.2014 | 17/14 | 14/00614-13 |
| 4 Tekniska nevnd | 09.09.2014 | 224/14 | 14/00614-13 |
| 5 Tekniska nevnd | 10.02.2016 | 18/16 | 14/00614-13 |
| 6 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 73/16 | 14/00614-13 |
| 7 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 83/16 | 14/00614-13 |

**Ferðslutrygdarætlan**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Málið verður framlagt til umrøðu.

**Ferðslunevndin 4. november 2013:** Útsett.

**Ferðslunevndin 18. desember 2013:** Málið umrøtt og tikið uppaftur 8. januar 2014.

**Ískoyti:**
Umboð frá Rambøll koma at greiða frá ferðslutrygdarætlanini og hvørji innsatsøki tekniska nevnd skal taka støðu til, áðrenn málið verður at framleggja og staðfesta í býráðnum.

**Tekniska nevnd 5. februar 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ferðslunevndin 19. februar 2014:** Útsett.

**Ferðslunevndin 26. februar 2014:**
Ferðslutrygdarætlanin varð umrødd. Ferðslunevndin mælir til at taka undir við framlagda tilfarinum til fundin í teknisku nevn 05.02.14. Mælt verður eisini til at innsatsøkini fyri ferðslutrygdarætlanini verða hesi:

1. Politieftirlit.
2. Óhapp av fólki til gongu.
3. Óhapp á vegamótum.
4. ”Svartir plettir”

Málið beint í teknisku nevnd.

**Ískoyti**:
Í sambandi við viðgerð av málinum um ferðslutrygdarætlan er ynskiligt at hildin verður ein evnisdagur at viðgera málið møguliga saman við t.d. parkeringspolitikkinum j.nr. 14/03209.

Sambært kommunustýrisskipan fyri Tórshavnar kommunu § 39, 17. petti kunnu býráðið og føstu nevndirnar taka avgerð um, at kommunustýrislimur kann luttaka á skeiði, kunningarferð, umboðan v.m. bæði innan- og uttanlands. Tá verður samsýning ella endurgjald latið einstøku kommunustýrislimunum eftir reglunum í pkt. 4 í kunngerðini um samsýning.

Ynskir ein nevnd at luttaka í nevnda virksemi, skal umbønin góðkennast av fíggjarnevndini. Er talan um fíggjarnevndina, skal býráðið góðkenna umbønina.

Ynskir býráðslimur at luttaka í nevnda virksemi, skal umbønin góðkennast av avvarðandi nevnd.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at hildin verður ein evnisdagur tann 29.09.2014, at umrøða ferðslutrygdarætlan og parkeringspolitikk.

**Tekniska nevnd 9. september 2014:** Samtykt at hildin verður evnisdagur tann 22. oktober 2014, at umrøða hesi evni: Ferðslutrygdarætlan, parkeringspolitikk, privatar vegir og spillvatnsætlan.
Bogi Andreasen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin kunnar um málið.

**Tekniska nevnd 10. februar 2016:** Samtykt at taka undir við niðurstøðuni í ferðslunevndini 26. februar 2014 og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.
Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Fíggjarnevnd og býráð skal taka støðu til samtyktina frá teknisku nevnd – nevnliga um at taka undir við ferðslutrygdarætlanini fyri Tórshavnar kommunu og at framhaldandi arbeiðið innan ferðslutrygd verður innan hesi innsatsøkini:

1. Politieftirlit.
2. Óhapp av fólki til gongu.
3. Óhapp á vegamótum.
   ”Svartir plettir”

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at skipa fyri felags fundi fyri allar býráðslimir at viðgera og kunna um ferðslutrygdarætlanina.

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Einmælt samtykt at taka undir við ferðslutrygdarætlanini fyri Tórshavnar kommunu og at framhaldandi arbeiðið innan ferðslutrygd verður innan hesi átaksøkini:

1. Politieftirlit.
2. Óhapp av fólki til gongu.
3. Óhapp á vegamótum.
   ‘’ Svartir plettir ‘’

Býráðið samtykti eisini at skipa fyri felags fundi fyri allar býráðslimir at viðgera og kunna um ferðslutrygdarætlanina.

# 84/16 Ferðslutryggjan av bygdavegunum í Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Ferðslunevndin | 11.02.2016 | 25/16 | 15/00192-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 02.03.2016 | 31/16 | 15/00192-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 09.03.2016 | 113/16 | 15/00192-1 |
| 4 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 84/16 | 15/00192-1 |

**Málslýsing:**
Í sambandi við at ferðslutryggja bygdavegirnar í Kollafirði, er uppskot gjørt um kantsteinsarbeiði og strikan av vegum, uppskot 15/00192-2.

**Tilmæli:**
Ferðslunevndin mælir til at taka undir við uppskoti 15/00192-2.

**Ferðslunevndin 11. februar 2016**: Samtykt at taka undir við uppskotinum. Málið beint í teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um ætlaða arbeiðið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta 1 mió. kr. av íløgum fyri aðrar vegætlanir, kt. 8175, fyri 2016 og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 02. mars 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Bogi Andreasen luttók ikki i viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 09. marts 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Einmælt samtykt.

# 85/16 Dagføring av vegnum undir Bryggjubakka- við uppihaldstrappuna har Perlan hevur staðið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 17.03.2015 | 89/15 | 15/00790-6 |
| 2 Tekniska nevnd | 17.03.2015 | 38/15 | 15/00790-6 |
| 3 Fíggjarnevndin | 18.03.2015 | 73/15 | 15/00790-6 |
| 4 Býráðsfundur | 19.03.2015 | 49/15 | 15/00790-6 |
| 5 Tekniska nevnd | 02.03.2016 | 35/16 | 15/00790-6 |
| 6 Fíggjarnevndin | 09.03.2016 | 114/16 | 15/00790-6 |
| 7 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 85/16 | 15/00790-6 |

## Málslýsing:

Í sambandi við arbeiðið at planleggja uppihaldstrappuna, har sum Perlan á sinni stóð, er uppskot komið frá Zeta arkitektum um at broyta vegaføringina á brekkuni niðan á Bryggjubakka. Víst verður í hesum sambandi til mál nr. 14/05063, at støða er tikin til linjuføringina av niðankoyringini á Bryggjubakka og staðfest av teknisku nevnd. Í nýggja uppskotinum verður hallið á vegnum betri, og vegurin gerst somuleiðis ein betri inngongd til Reyn. Broytta vegaføringin gerst ein betri liður í ferðslumynstrinum í Vágsbotni, ið bindur teir ymsu vegirnar og gonguteigarnar saman. Umstøðurnar gerast betri og tryggari hjá fólki til gongu, tí umskipanin letur upp fyri einum øki framman fyri uppihaldstrappuni, sum gerst ein gonguleið og sambindingarliður í ferðslumynstrinum. Ein nýggj umskipan av vegnum gerst harafturat eitt gott byrjanarstøði í eini møguligari framtíðarætlan fyri torgið í Vágsbotni, tí vegurin verður sneiddur ímóti torginum, sum er ein týdningarmikil liður í eini skipan av einum nýggjum torgi.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Sambært metingum frá Zeta arkitektum kemur dagføringin av vegnum at kosta uml. 2,1 mió. kr. Higartil eru játtaðar kr. 100.000,- av kto. 8175 til skitsuuppskot við kostnaðarmeting, so írestandi arbeiðið tørvar eina játtan álj. kr. 2.016.000,-. Lisitatión fyri innbodnum arbeiðstakarum ísv. undirhondsboð verður hildin 16.03.2015, og tá ber til at upplýsa ítøkiligari hvussu kostnaðarstøðið verður.

## Tilmæli til teknisku nevnd:

Tekniski stjórin og býarverfrøðingurin mæla til at játta kr. 2.016.000,- av kto. 8175 fyri vegir 2015 og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 17. mars 2015:** Kunnað varð um málið.

**Tekniska nevnd 17. mars 2015:** Nevndin samtykti at játta kr. 2.740.000 av konto 8175 samsvarandi skjali nr. 15/00790-11 og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Ìskoyti:**
Trý tilboð eru komin inn at gera dagføra vegin og gera uppihaldstrappuna (mál 14/05063). Talan er um samlað tilboð fyri bæði arbeiðini, sí j.nr. 15/00790-10.

Sp/f Andrias Berg hevur lægsta tilboðið áljóðandi kr. 2.344.767,00.

Articon hevur næstlægsta tilboðið áljóðandi kr. 3.208.235,00.

J&K Petersen hevur boðið sær at gera arbeiðið fyri kr. 3.422.178,00.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at taka av lægsta tilboðnum hjá Sp/f Andriasi Berg og viðvíkjandi arbeiðinum at dagføra vegin at taka undir við teknisku nevnd og játta kr. 2.740.000 av konto 8175 samsvarandi skjali nr. 15/00790-11 og at beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevnd 18. mars 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 19. mars 2015:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sum kunnugt hava fleiri trupulleikar verðið við Uppihaldstrappuni í Vágsbotni og dagføring av vegi niðan á Bryggjubakka, sum hava havt seinkingar við sær. Hetta hevur eisini havt meirkostnað við sær. Grótveitarin hevur ikki megnað at fáa tilfarið fram til tíðina, við tí avleiðing at meirútreiðslur hava verðið fyri arbeiðstakara og byggiharra. Arbeiðið hevur ligið stilt eina tíð, men er nú byrjað aftur, og grót er niðurfyri. Eisini hevur trappuprosjektið skula broytt og tillagað seg gjøgnum byggitíðina við viðmerkingum og krøvum frá Fornminnisnevndini. Ein loysn tykist nú endiliga verða komin undir land.

Eisini hava meirútreiðslur verðið av umleggingum av kaðalum og leiðingum í vegnum, sum mann ikki var vitandi um, áðrenn arbeiðið fór ígongd.

Talan er um tvær ymiskar verkætlanir, sum eru bodnar út saman og samstundis, og har sami arbeiðsgevari er á báðum verkætlanum.

Samlaða hækkingin fyri báðar verkætlanirnar er kr. 710.000,00 tilsamans. Torført er at gera upp nágreiniligt býti, men helvtarbýti verður mett at verða á góðari leið.

Krøv og broytingar frá Fornminnisnevndini, verða mett at verða kr. 300.000. Seinkingar frá grótveitara verður mett til 300.000,00 kr., her íroknað til- og avriggingar í sambandi við Voxbotn, ólavsøku og jól.
Broytingar av verandi kaðalleggingum, hevur ein meirkostnað á kr. 160.000 við sær.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at hækka játtanina við kr. 355.000,00 av 8175 – "aðrar vegaverkætlanir" og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 02. mars 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 09. marts 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið i býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Einmælt samtykt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>17. mars 2016 | Blað nr.: 12904<br>Formansins merki: |

# 86/16 Ferðsluviðurskifti við skúlan í Fríðrik Petersensgøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 10.02.2016 | 41/16 | 16/00850-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 75/16 | 16/00850-1 |
| 3 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 50/16 | 16/00850-1 |
| 4 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 86/16 | 16/00850-1 |

**Málslýsing:**
Skúlastýrið hjá Skúlanum á Fløtum hevur í skrivi í januar 2016 víst á avbjóðandi ferðsluviðurskiftini kring eindina í Fríðrik Petersensgøtu. Í fjør vóru gjørdar ábøtur viðv. ferðslutrygdini, eitt nú er partar av økinum gjørt til 30 km/t zonu og betri uppmerking.

Fyri at bøta meiri um ferðslutrygdina og serliga við atliti til av- og áskipan av næmingum, er gjørt uppskot við eini loysn har tað niðan framyvir skúlanum í Fríðrik Petersensgøtu – umleið 10 metrar frá vegamótinum við Landavegin verður gjørd av- og áskipan fyri 4 bilar (kiss'n bye-'økið!) við støði í loysnini, ið áður er gjørd við fyrrv. Frískúlan við Hoyvíkstjørn. Tó uttan kant millum av- og áskipanarplássini og koyribreytina og merkir hetta, at teir 4 bilarnir induviduelt kunnu sleppa út á vegin umvegis treytaleysa víkiskyldu.

Í gøtuni er eisini ein dagstovnur, og hann fer eisini kunnu fáa gagn av hesum nýggja møguleikanum.

Tekniska fyrisitingin hevur mett at loysnin kann fremjast fyri umleið 200 tkr.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at heimila trivnaðarfyrisitingini saman við teknisku fyrisiting at fyrireika og fremja nevnda uppskot innanfyri ein fíggjarkarm á 200 tkr., ið skal fíggjast av 4140 Ætlanir á skúlaøkinum játtanini til útiøki hjá skúlum.

**Mentamálanevndin 10. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, men játta upphæddina av løgukontuni 4176 Nýbygging skúlar (Skúlan á Fløtum) og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Játtanin at beina á konto 8110 vegir o.a.

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Einmælt samtykt.

## 87/16 Umsókn um byggiloyvi til bilhús/skýli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.03.2016 | 66/16 | 16/00375-4 |
| 2 Fíggjarnevndin | 09.03.2016 | 109/16 | 16/00375-4 |
| 3 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 87/16 | 16/00375-4 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Søkt verður av nýggjum um at byggja bilhús/skýli á Býggjarvegi 7, matr. nr. 990g
Bygging verður íalt 42 $m^2$.
Bygging íalt, sethús og bilskúr, verður 172 $m^2$

Umsøkjarin fekk byggiloyvi til hetta bilskúrið í 2002, men byggingin varð ikki fullførd, Fyribils varð bert gólvkonstruktiónin gjørd sum eitt parkeringspláss.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í A1 í 3. grundumráði í Almennu Byggisamtyktini.

Ein deklaratión frá 1970 er tinglýst fyri økið.

M.a. stendur í deklaratiónini:
- at bilskúrar skulu standa minst 5 m frá vegmarki
- at ábygging (byggistig) má ikki vera størri enn 25%

**Upplýsingar frá umsitingini**
Torført verður at fylla upp og byggja bilskúr 5 m frá vegi. Har er so stórur jarðarmunur.
Í almennu Byggisamtyktini stendur í kap. IV,§10,1, at:
...... *Bilskúrur skal standa í minsta lagi 5 m frá marki til veg. Tó kann byggivaldið, tá ið talan er um minni týðandi veg, ella tá ið lendi ikki loyvir tí, geva loyvi til, at bilskúrur verður settur nærri vegi.*........

Mest vanliga byggistigi runt býin er 0,3 umframt 0,1 til møguligt bilskúr/úthús osv.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Aðrastaðni í somu gøtu er bygt bilskúr heilt út móti vegmarki.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Bygging av bilskúri verður móti vegmarki ístaðin fyri 5 m frá.
Byggistigið íroknað bilskúr verður 0,3 har mest loyvda er 0,25.

**Umhvørvisárin**
Ongi umhvørvisárin

**Fíggjarlig viðurskifti**
Onki fíggjarligt fyri Kommununa

**Viðmerkingar frá øðrum deildum**

Ongar viðmerkingar

**Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum**
Ongar viðmerkingar

**Skjøl:**

| | | |
|---|---|---|
| - | Tvær myndir av økinum | 16/00375-3 |
| - | Kort yvir økið | 16/00375-3 |
| - | Deklaratión (tekstur síðsti partur pkt. 4) | 16/00375-3 |
| - | Umsókn | 16/00375-2 |
| - | Tekningar, 3 stk, bilhús 1 – 2 – 3 | 16/00375-2 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til, at málið verður sent til grannahoyring og verður lagt fyri fíggjarnevndina, og um onki mótmæli er, so at ganga umsóknini á møti.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. mars 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 09. marts 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Einmælt samtykt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>17. mars 2016 | Blað nr.: 12907 |
| | Formansins merki: |

# 88/16 Umsókn um broyting av byggisamtyktini fyri matr. nr. 1470 m frá D1-øki til A1-øki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.03.2016 | 70/16 | 16/00699-2 |
| 2 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 88/16 | 16/00699-2 |

**Málslýsing:**
Umsókn frá Høgna Egilstrøð Hansen og Bjørg Dam søkja um at fáa broytt byggisamtyktina fyri matr. nr. 1490m, Tórshavn, frá D1øki til A1-øki. Ognin liggur eystan fyri Sundsvegin og er grannaogn til matr. nr. 1401a, sum lutvíst var broytt frá D1 til A1 øki, við góðkenningarskrivi frá Fiskimálaráðnum, dagfest 20. august 2014 (j.nr. 14/00845).

Broytingin av byggisamtyktini fyri matr. nr. 1401a, Tórshavn, var ein partur av fleiri broytingum í økinum við Sundsvegin og Sortudýki. Táverandi tekniski stjórin mælti frá at gera broytingar í byggisamtyktini eystan fyri Sundsvegin tí mett var, at hetta var ein natúrligur partur av fríøkinum við Hoydalsá. Endin var tó, at byggisamtyktin bleiv broytt til A1-øki eystur til friðingarlinjuna til Hoydalsá, ella gott helmingin av ognini.

Í teimum broytingunum í byggisamtyktini, var matr. nr. 1470m, sum nú verður søkt um at broyta, ikki tikið við orsakað av at eingin umsókn um broyting av hesi ogn fyrilá og at mett var av tekniska stjóranum, at økið eystan fyri Sundsvegin ikki skuldi broytast.

Umsitingin metir, at umsóknin skal gangast á møti soleiðis at byggisamtyktin verður broytt til A1-øki eystur til friðingarlinjuna við Hoydalsá t.v.s. at størsti parturin av matr. nr. 1470m og alt matr. nr. 1470bs verður broytt.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at ganga umsóknini á møti og broyta byggisamtyktina sambært kortskjali, dagfest 25.02.2016.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. mars 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Einmælt samtykt.

# 89/16 Gamlarætt. Leinging av flótibrúgv til ferðavinnubátar.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 01.02.2016 | 2/16 | 16/00207-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 70/16 | 16/00207-1 |
| 3 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 66/16 | 16/00207-1 |
| 4 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 89/16 | 16/00207-1 |

**Málslýsing:**
Í 2008 legði Tórshavnar kommuna eina flótibrúgv á Gomlurætt, sum var ætlað til ferðavinnubátar, sum gjørdu túrar vestanfyri. Eisini skuldi brúgvin brúkast til bátar úr Hesti og Koltri, sum sigldu um fjørðin.
Tá brúgvin bleiv løgd út, var tað mest Norðlýsið, sum sigldi við ferðafólki.

Síðani er nógv hent, og í dag eru tað 3 feløg, umframt “Norðlýsið”, sum javnan brúka flótibrúnna í sambandi við túrar, mest til Hest og Koltur. Hetta viðførir at Kolturs- og Hestbátar, hava trupult at fáa pláss við brúnna.

Í 2015, hava bátarnir, sum sigla við ferðafólki av Gomlurætt, verið hesir:
Rib 62: 2 bátar.
Jab Adventure: 2 bátar
Nax Adventure: 1 bátur

Umframt hesar, hava Silja, Jósup og aðrir ferðafólkabátar brúkt brúnna á Gomlurætt av og á.

Í heyst eru bátar lagstir afturat, og fyri 2016 sær tali av bátum soleiðis út.
Rib 62: 2 bátar
Jab Adventure: 4 bátar
Nax Adventure: 2 bátar

Trýstið á plássini við brúnna var stórt í 2015.

Við enn fleiri bátum, kann væntast at trýstið verður enn størri í 2016.

Tórshavnar havn hevur kannað, hvat tað kostar at leingja ferðavinnubrúnna við 15 metrum afturat.

Um brúgvin blívur longd, fær hvørt av teimum trimum feløgunum eitt pláss í part, pláss verður til Norðlýsið ella annan líknandi bát, og pláss verður til tveir bátar úr Koltri og Hesti.

Kostnaðarmeting fyri 15 metrar av flótibrúgv við útlegging er mett til 250.000kr.

Tórshavnar havn hevur verið í samband við Landsverk, sum siga seg vilja viðgera eina umsókn um loyvi at leingja verðandi flótibrúgv, til vælvild.

Um peningur verður játtaður, og loyvi fæst frá landsverk at leingja brúnna, verður nýggja brúgvin klár til summarið 2016.

Tað er Tórshavnar kommuna, sum rindar fyri íløgur í bátapláss.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>17. mars 2016 | Blað nr.: 12909 |
| | Formansins merki: |

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til at taka støðu til, um íløgan skal gerast. Um íløgan skal gerast, og loyvi fæst frá LV, verður mælt til at játta kr. 250.000,- til arbeiðið.

**Vinnunevndin 01. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við vinnunevndini og játta kr. 250.000, ið verða fluttar av konto 5175, renovatión, á konto 7476, smábátahavnir. Málið beint í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini, fyri síðani at játta útleggið aftur í ár.

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Einmælt samtykt.

# 90/16 Broyting av bátaøkinum á Skálatrøð frá teymum til bátabummar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 01.02.2016 | 4/16 | 16/00285-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 72/16 | 16/00285-1 |
| 3 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 68/16 | 16/00285-1 |
| 4 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 90/16 | 16/00285-1 |

**Málslýsing:**
Tað er eitt ynski hjá teimum, sum hava bátateym, at báturin kann fáa pláss við ein bátabumm ístaðin.
Tað er nógv høgligari at hava pláss við eina flótibrúgv, og ikki heilt vandaleyst at sleppa umborð á ein bát, sum liggur við teym.

Tað eru 27 bátapláss í Skálatrøð sum hava teym.

Um tað blíva keyptir 75 metrar av nýggjum flótbrúgvum við tilhoyrandi bátabummum, fáa vit pláss fyri teimum 27 bátunum, sum nú liggja við teym, umframt 18 bátapláss afturat.
Um brúgvarnar verða á umleið sama støði, sum nýggju brúgvarnar á Argjum, ið eru útgjørdar við el steyrum, ljósi og vatni, er samlaði kostnaðurin kr. 2.235.000.

Tórshavnar havn hevur áður staðið fyri innkeypi og útlegging av bátabrúgvum, við hjálp frá undirveitarum.

Brúgvarnar koma at hava umleið somu frástøðu frá virkseminum hjá MEST, sum verðandi brúgvar.

Tað er Tórshavnar kommuna, sum rindar fyri íløgur í bátapláss.

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til at taka støðu til, um iløgan skal gerast. Um íløgan skal gerast, verður mælt til at játta kr. 2.235.000,- til arbeiðið.

**Vinnunevndin 01. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at játta kr. 2.235.000, ið verða fluttar av konto 5175, renovatión, á konto 7476, smábátahavnir. Málið beint í býráðið til tvær viðgerðir.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>17. mars 2016 | Blað nr.: 12911<br>Formansins merki: |

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini, fyri síðani at játta útleggið aftur í ár.

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Einmælt samtykt.

# 91/16 Útstykking á Kongavarða til grundstykkir á matr. nr. 255a, Argir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2014 | 73/14 | 14/05161-3 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.02.2015 | 41/15 | 14/05161-3 |
| 3 Fíggjarnevndin | 11.03.2015 | 57/15 | 14/05161-3 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.03.2015 | 97/15 | 14/05161-3 |
| 5 Fíggjarnevndin | 22.04.2015 | 92/15 | 14/05161-3 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.10.2015 | 190/15 | 14/05161-3 |
| 7 Tekniska nevnd | 04.11.2015 | 133/15 | 14/05161-3 |
| 8 Fíggjarnevndin | 11.11.2015 | 279/15 | 14/05161-3 |
| 9 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.02.2016 | 55/16 | 14/05161-3 |
| 10 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 63/16 | 14/05161-3 |
| 11 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 61/16 | 14/05161-3 |
| 12 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.03.2016 | 79/16 | 14/05161-3 |
| 13 Fíggjarnevndin | 17.03.2016 | 119/16 | 14/05161-3 |
| 14 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 91/16 | 14/05161-3 |

**Málslýsing**:
Tórshavnar kommuna hevur keypt ognina undir Kongavarða, matr. nr. 255a, Argir, frá Valbjørn Dalsgarð.

Sambært uppruna ætlanini fyri Kongavarða skuldi ovasti parturin av økinum nýtast til raðhúsabygging, men kommunan hevur ætlanir at útstykkja økið til sethúsagrundstykkir.

Neyðugt er at gera skipanarætlan fyri alt økið.

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin mælir til, at nevndin heimilar umsitingini:

- at umsitingin, saman við ráðgeva, ger eitt skipanaruppskot fyri alt økið, sum umfatar byggiøki, felags- og fríøkir, atkomuviðurskifti, vegir og gøtur v.m. og at gera eina fyribils kostnaðarmeting.
- at arbeiði, sum er mett at kosta kr. 100.000, í fyrsta umfari verður fíggjað av serkønari hjálp á teknisku fyrisitingini 1313.
- At skipanaruppskotið verður at leggja fyri nevndina aftur.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Býarskipanardeildin hevur gjørt eitt skipanaruppskot fyri fyri ognina undir Kongavarða. Eftir uppskotinum er pláss til 30 raðhús, 4 íbúðarhús og 50 grundstykkir til sethús.Fyri at náa einum talið uppá 50 grundøkir til sethús, er tó neyðugt at gera eitt makaskifti uppá uml. 1500

$m^2$ við Búnaðarstovuna, soleiðis at teir fáa uml. 1500 $m^2$ burtur av matr. nr. 255a fyri uml. 1500 $m^2$ av matr. nr. 4a Kirkjubøhagi Fyri Handan, Poul Müller festari.

Atkomuvegurin niðan til tey 50 sethúsagrundstykkini er uml. 375 m, max hall er 120 promillu. Hesin vegurin er mettur at kosta uml. 6,5 milliónir. Hesin vegurin kann verða atkoma til fleiri grundstykkir, um kommunan fær ognað sær meira lendi burtur av matr. nr. 4a.

Grundstykkini eru uml. 400 $m^2$ til støddar.

Tað ber ikki til at gera eina kostnaðarmeting út frá verandi tilfari.

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin mælir til at taka undir við skipanaruppskotinum, at abeiða víðari við at gera eina kostnaðarmeting og løgdeildin tekur samráðingar upp við Búnaðarstovuna um makaskiftið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. februar 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 11. marts 2015:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur arbeitt víðari við skipanaruppskotinum og gjørt tilhoyrandi kostnaðarmeting. Fyri at minka um hallið á býlingsvegnum, eru smávegis broytingar gjørdar í ætlanini. Fyri at fáa so gott útsýni sum møguligt frá hvørjum grundstykki sær, verður arbeitt við fastløgdum planeringskotum . Sí skjal nr. 4 og 5.

1. Býlingsvegur til 4 íbúðarblokkar og p-pláss til 24 íbúðir. Býlingsvegurin er 200 m langur og pláss er fyri 2 bilum til hvørja íbúð.
2. Býlingsvegur til útstykking við 50 grundstykkjum. Býlingsvegurin er umleið 345 m langur, og gongubreyt er uttarumegin vegin. Partar av vegnum krevja nógv fyrireikandi lendisarbeiði. Hægsta veghall er umleið 120 promilli.
3. Sethúsavegur við 50 grundstykkjum. Vegurin er 490 m langur, 9 m breiður, og 1,5 m breið gongubreyt er báðumegin. Hægsta veghall er umleið 100 promilli.

Viðheft er kostnaðarmeting við mettum kostnaði á
Skjal nr. 1. Býlingsvegi til íbúðarblokkarnar
Skjal nr. 2. Útstykking undir Kongavarða
Skjal nr. 3. Býlingsvegi til útstykkingina undir Kongavarða
Viðheft er eisini
Skjal nr. 4. Útstykking og atkomuvegur.
Skjal nr. 5. Útsýni

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at seta í gongd projektering av projektuppskoti við kostnaðarmeting og tíðarætlan fyri nummar 2. Býlingsveg til útstykking, og nummar 3. Sethúsaveg við 50 grundstykkjum, at uppskot til serstaka byggisamtykt verður gjørt, at leggja fyri nevndina aftur og at beina málið í teknisku nevnd.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. mars 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 22. april 2015:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Ískoyti:**
LBF hevur gjørt útbjóðingartilfar til útstykkingina við 48 grundstykkjum. Afturat uppruna uppskotinum er gjørt 2 felags parkeringspláss í útstykkingini og gongubreyt og súkklubreyt báðu megin atkomuvegin. Projektið er granskað og góðkent við smávegis broytingum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at bjóða útstykkingina út í almennari lisitatión og at innkomnu boðini verða løgd fyri byggi- og býarskipanarnevndina skjótast gjørligt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, men at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión.

**Ískoyti:**
Tekniska nevndin skal taka støðu til vegaføringina og teknisku veitingarnar í sambandi við útstykkingarætlanina.

**Tekniska nevnd 04. november 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá býararkitektinum og tekniska stjóranum til fundin í byggi- og býarskipanarnevndini 2. oktober 2015. Nevndin hevur tó hesar viðmerkingar:

- Býlingsvegur til íbúðarblokkarnar (skjal 1) skal hava gongubreyt á báðum síðum.
- Útstykking undir Kongavarða (skjal 2) – vegurin skal hava gongu- og súkklubreyt á báðum síðum.
- Býlingsvegur til útstykkingina undir Kongavarða (skjal 3) – skal hava gongubreyt á báðum síðum.

Nevndin tekur ikki støðu til útbjóðingarhátt.

**Ískoyti:**
Fíggjarnevndin skal taka støðu til samtyktina hjá Byggi- og býarskiparnevndini 02. oktober 2015 og samtyktina hjá Teknisku nevnd 04. november 2015.

**Fíggjarnevndin 11. november 2015:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur, samsvarandi samtykt byggi- og býarskipanarnevndarinnar tann 2. oktober 2015 og eftirfylgjandi býráðsnevndarsamtyktum, boðið arbeiðið at gera atkomuvegin og útstykkingina út í innbodnari lisitatión.

Inn komu fylgjandi tilboð og tilboðsupphæddir:

| | |
|---|---|
| Sp/f TG Verk: | kr. 25.966.157,-. |
| P/f Articon: | kr. 16.644.779,-. |
| P/f J. & K. Petersen: | kr. 19.619.450,-. |

Ráðgevi kommununnar hevur eftirkannað tilboðini og mælir til at taka av tilboðnum frá P/f Articon.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka av tilboðnum frá P/f Articon og heimila umsitingini at samráðast við P/f Articon um sáttmála um arbeiðið, at leggja fyri nevndina aftur saman við samlaðari kostnaðarmeting av arbeiðinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur latið gera samlaða kostnaðarmeting, við støði í uppskoti til sáttmála við P/F Articon (sí j. nr. 14/05161-73), har prosjektering, forkanningar, byggileiðsla, fakeftilit, fyrisiting, óvæntað og MVG v.m. er íroknað.

Við grundarlag í nevnda sáttmálauppskoti við P/f Articon metir umsitingin, at útstykkingararbeiðið kann gerast fyri kr. 26.284.793,- tá allar útreiðslur eru íroknaðar (sí j. nr. 14/05161-72) har væntað verður, at helvtin av upphæddini fellur til gjaldingar í 2016.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararktekturin og býarverkfrøðingurin mæla til, at góðkenna uppskotið til sáttmála og játta kr. 26.284.793,- til gerð av útstykkingini.
Mælt verður til at helvtin av játtaðu upphæddini 13 mió. verður fíggjað við ávegisgjøldum í sambandi við sølu av grundøkjum í 2016 og restfíggingin verður tikin upp við endaliga áseting av søluprísi og íløguætlan kommununnar í 2016 og 2017.
Eisini verur mælt til at heimila umsitingini at útvega prosjekt og tilboð uppá at planera grundøkini.
Málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. mars 2016:** Samtykt at góðkenna uppskotið til sáttmála og at játta kr. 21.554.795,- til gerð av útstykkingini. Eisini verður mælt til at heimila umsitingini at útvega projekt og tilboð uppá at planera grundstykkini.
Málið verður beint í figgjarnevndina og býráðið.

**Fíggjarnevndin 17. marts 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og játta kr. 21.554.795 av konto 6475, ið verður fíggjað við gjøldum í sambandi við sølu av grundøkjum í 2016. Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Einmælt samtykt.

# 92/16 Útleigan/søla av Sjóvinnuhúsinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 01.02.2016 | 6/16 | 16/00654-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 03.02.2016 | 48/16 | 16/00654-1 |
| 3 Vinnunevndin | 04.04.2016 | 12/16 | 16/00654-1 |
| 4 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 92/16 | 16/00654-1 |

**Málslýsing:**
**Útleigan/søla av Sjóvinnuhúsinum.**
Á sumri 2012 varð farið undir at klæða Sjóvinnuhúsið. Bygningurin var tá í sera vánaligum standi, og trongdi til umfatandi ábøtur. Avgerðin bleiv tikin við tí í huga, at brúka eitt aktiv, sum partvíst stóð óvirkið, at brúka til virksemið hjá Tórshavnar havn og annars at útleiga restina til vinnuligt endamál.

Í august 2014 samtykti býráðið at byrja arbeiðið at innrætta bygningin. Hetta arbeiðið er komið so mikið langt, at partar av bygninginum kunnu takast í brúk innan stutta tíð, meðan tann parturin har siloin er, ikki verður liðugur fyrr enn út móti summarinum.

Kommunan hevur havt ætlaninir um at leiga 2 hæddir í bygninginum, og møguliga at brúka part av siloini til býráðssal. Endalig støða er ikki tikin til hetta.

Tað hevur verið lýst við, at ætlanin er at útleiga ein part av bygninginum til sjórelateraða vinnu. Tað hevur verið ein ávísur áhugi at leiga, men hetta rúmast á einari hædd.

Í løtuni eru tað 4 leigarar, sum eru klárir at flyta inn, í tilsamans 500 ferm. Avtala má gerast vit hesar leigarar um, at teir ikki kunnu flyta inn, fyrr enn endalig støða er tikin til nýtsluna, aftan á 14. mars 2016.

Áðrenn útbyggingina hevur bygningurin í stóran mun verið brúktur til vinnulig endamál, eins og havnaøkið á Vestaru bryggju.

Aftan á at umbyggingin byrjaði, hevur áhugin at leiga í bygninginum verið avmarkaður, kanska serliga tí tað hevur verið eitt krav, at leigararnir skulu fáast við sjórelateraða vinnu.

Tað hevur verið frammi, at kommunan helst ikki skal leggja seg út i tann avmarkaða leigumarknaðin fyri skrivstovur.

Áðrenn endalig avgerð verður tikin um at brúka stóran part av bygninginum til kommunala umsiting, eigur bygningurin at verða lýstur til sølu, ella í øðrum lagi til leigu til ein og sama leigara, at brúka til maritima vinnu, ferðavinnu ella annað virksemi, ið gevur býnum nýtt innihald t.d. innan gransking, menning ella altjóða samstarv.

**Søla av bygninginum:**
Partar av bygninginum eru um at verða lidnir. Tann eystari parturin, har siloin er, verður liðugur komandi summar. Um bygningurin verður seldur, er tað greiðast at selja hann við teimum avtalaðu umvælingunum. Grundøkið og bygningur eru ogn hjá Tórshavnar havn, tí kann bygningurin ikki seljast oman av grundøkinum. Um bygningurin verður seldur, má ein møguligur komandi eigari gjalda leigu fyri uttanumøki til parkering.

**Leiga av bygninginum:**
Um ein leigari skal kunna gera íløgur bygningin, má tað verða møguligt at leiga bygningin í upp til 30 ár.
Tá tað er ein og sami leigari, er tað greiðari at leigarin stendur fyri øllum viðlíkahaldi, rakstri og trygging av bygninginum.
Vanligar treytir fyri bygningar á havnaøkinum er, at tá 30 ár eru farin kann eigarin yvirtaka íløguna, sum leigarin hevur gjørt fyri ½ av metingarvirðinum. Ynskir leigarin ikki at uppsiga leigumálið, kann hetta verða longt við 10 árum hvørja ferð, eftir ásettum teytum.

Siloin hevur eitt serligt skap við góðum útsýni, og eigur tað tí at vera ein treyt til tann sum keypir/leigar bygningin, at tann parturin verður brúktur til útvent virksemi so sum matstovu, ráðstevnur, framsýningar ella annað virksemi har almenningurin hevur atgongd.

Tá støða skal takast til hvat er besta tilboðið, eigur hetta av verða mett út frá eini heildarmeting av innkomnu ætlanunum/prospektunum við støði í prísi, sannlíkindum fyri, at ætlanin kann fremjast, hvussu ætlaða virksemið í bygninginum hóskar á havnarlagnum og váttan um fígging av íløgu og rakstri.

Teir, sum bjóða, mugu lýsa ætlanina og viðleggja váttan um, at fígging er tøk.
Tilboðini, sum koma inn, mugu verða bindandi, og teir sum bjóða, mugu standa við boðnum í 4 vikur aftan á tilboðsfreistina.

Kommunan má kunna tilskila sær rætt til at velja millum ella vraka øll innkomin tilboð.

Um bygningurin skal brúkast til annað enn sjóreleateraða vinnu, so eigur byggisamtyktin at verða broytt.

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til at lýsa bygningin til sølu/leigu.
Møgulig tilboð skulu verða inni í seinasta lagi 7. mars 2016.

Mælt verður eisini til at broyta byggisamtyktina, soleiðis at bygningurin kann brúkast til annað enn sjórelateraða vinnu.

**Vinnunevndin 01. februar 2016:**
Ein meiriluti: Sjúrður Olsen, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Bjørghild Djurhuus tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti: Jákup Dam tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 03. februar 2016:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein, taka undir við vinnunevndini.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á einum seinni fundi.

**Ískoyrti:** Tá tíðarfreistin var farin at lata inn tilboð upp á Sjóvinnuhúsið, var onki tilboð upp á at keypa, meðan eitt tilboð var frá P/F Smyril Line upp á at leiga allan bygningin.

Ætlanin hjá Smyril Line er at brúka bygningin til hotel, har umsøkjarin lagar bygningin til, soleiðis at tað klárt er at taka hotellið í brúk á vári 2015.

Tilboðið lúkar treytirnar í lýsingini at siloin verður brúkt til útvent virksemi har almenningurin hevur atgongd og at váttan um fígging er viðløgd.

Fakta um hotellið:
91 dupult kømur og fleiri smærri fundarhølir.

Í siloini er matstova í niðastu hædd við plássi til 350 fólk, við trappu upp á 2 hædd til eina minni matstovu. Á 4 hædd er høli til fyrilestrar o.a. við plássi til 300 fólk.

**Úrdrag úr leigusáttmála:**
Uppskot upp á 30 ára leiguavtalu er gjørd millum Tórshavnar havn og Smyril Line.
Árliga leigan verður t.kr. 3.300 frá ár 3 til og við ár 28.
Fyrstu tvey árini, verður árliga leigan tó t.kr. 1.665.
Á r 29 og 30, verður árliga leigan t.kr. 1.995.
Um leigumálið heldu áfram hereftir, verður árliga leigan aftur t.kr. 3.300.
Leigarin stendur fyri øllum viðlíkahaldi.

Tá 30 ár eru farin, kann eigarin uppsiga leigumálið, og yvirtaka møguligar íløgur, sum leigarin hevur gjørt fyri ½ av metingarvirðinum. Ynskir eigarin ikki at uppsiga leigumálið, kann hetta verða longt við 10 árum.

Avtala er gjørd millum Tórshavnar havn og ymiskar arbeiðstakarar, um arbeiðið at byggja Sjóvinnuhúsið. Hesar avtalur verða hildnar og bygt verður fyri tað avtalaðu sáttmálaupphæddina. Tillagingar kunnu gerast fyri tað, sum er eftir at byggja, soleiðis at tað arbeiðið sum veður gjørt, eisini kann brúkast til nýggja virksemi hjá leigaranum.

Smyril Line stendur fyri og rindar fyri tillaging av bygninginum, so hann kann brúkast til hotel.

**Tilmæli:** Havnarmeistarin mælir til at taka undir við leigusáttmálanum.

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Tikið av skrá.

# 93/16 Eykajáttan í sambandi við at at Tórshavnar kommuna verður 150 ár í 2016

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 15.03.2016 | 117/16 | 16/01304-1 |
| 2 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 93/16 | 16/01304-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.03.2016 | 118/16 | 16/01304-1 |
| 4 Býráðsfundur | | | 16/01304-1 |

**Málslýsing:**
Í sambandi við, at Tórshavnar kommuna verður 150 ár 2016 og ætlanin er at skipa fyri ymiskum tiltøkum í døgunum 26. mai til 29. mai 2016. Eisini er ætlanin, at skipa fyri tiltøkum, tá onnur tiltøk eru í býnum ígjøgnum árið t.d. Mentanarnátt, ólavsøka, M.A. Jacobsen og ymiskt fyri børn og eldri á stovnum. Ætlanin er eisini, at gera eina framsýning og ein film um Havnar søgu. Tað verður hervið biðið um eykajáttan á kr. 550.000,00 til útreiðslur.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og fyrisitingarstjórin mæla til at játta av konto 20910 á konto 5310, mentanartiltøk og annað, 550.000 kr. til útreiðslur í sambandi við at Tórshavnar kommuna verður 150 ár.

**Fíggjarnevndin 15. mars 2016 umvegis teldupost:** Einmælt samtykt.

**Fíggjarnevndin 17. marts 2016:** Staðfest at játta kr. 550.000 sum eykajáttan av konto 20910 á konto 5310, mentanartiltøk og annað, og málið beint í býráðið at viðgera tvær ferðir.

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Einmælt samtykt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>17. mars 2016 | Blað nr.: 12920 |
| | Formansins merki: |

# 94/16 FÆ 2017 - tíðarætlan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 09.03.2016 | 116/16 | 16/01224-1 |
| 2 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 94/16 | 16/01224-1 |

**Málslýsing:**

| | | |
|---|---|---|
| Strategi | 9. mars | Fíggjarnevndin samtykkir tíðarætlan |
| | 13. apríl | Teknisk fíggjarætlan 2015 |
| | 18.apríl | Evnisdagar: Politisk mál og raðfestingar |
| | apríl | Við støði í evnisdegnum ger stjórnin uppskot til fíggjarætlan 2015 á greinastøði |
| | 11. mai | Uppskot leggjast fyri fíggjarnevnd |
| Fyrireiking | mai | Økisleiðarar gera uppskot út frá fíggjarnevndarsamtykt at leggja fyri faknevndirnar |
| | Mai/Juni | Nevndirnar viðgera uppskotið og gera tilmæli til fíggjarætlan |
| | Juni | Stjórnin ger uppskot til fíggjarætlan við støði í viðger frá faknevndunum |
| | 8. juni | Uppskotið verður lagt fyri fíggjarnevndina |
| | Juni | Tá uppskotið er góðkent av fíggjarnevndini, verður melda út til leiðararnar at deila játtanina á finanskontur og koma við neyðugu viðmerkingum. |
| | September | Nýggj inntøkumeting verður send fíggjarnevndini |
| | 7. september | Fíggjarnevndin viðger uppskot til fíggjarætlan og kemur við tilmæli til Býráðið |
| Politisk viðgerð | 15. september | Uppskot til fíggjarætlan verður lagt fyri Býráðið |
| | Oktober | Nevndarviðgerðir |
| | 19. oktober | 1. viðgerð í Fíggjarnevndini |
| | 27. Oktober | 1. viðgerð í Býráðnum |
| | 16. november | 2. viðgerð í Fíggjarnevndini |
| | 24. November | 2. viðgerð í Býráðnum |

**Tilmæli:**
Fyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin mæla til at góðkenna tíðarætlanina.

**Fíggjarnevndin 09. marts 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>17. mars 2016 | Blað nr.: 12921<br><br>Formansins merki: |

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Góðkent.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>17. mars 2016 | Blað nr.: 12922<br><br>Formansins merki: |

**FUNDURIN LOKIN KL. 21:45**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Jógvan Arge | Helena Dam á Neystabø |
| Tróndur Sigurðsson | Halla Samuelsen | Bogi Andreasen |
| Annfinn Brekkstein | Jákup Dam | Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal |
| Bjørghild Djurhuus | Elin Lindenskov | Sjúrður Johan Olsen |
| | Sigrun Amalia Mohr | |